# Skúlabygnaðurin

# í

# Eysturkommunu

November 2009

# Innihald

Samandráttur ..... 3
1.0 Grundarlag ..... 5
1.1 Býráðssamtykt ..... 5
1.2 Verkætlanarfyriskipan ..... 5
1.3 Arbeiðssetningur hjá verkætlanarbólkinum ..... 6
1.4 Arbeiðs- og tíðarætlan ..... 6
2.0 Byrjan ..... 7
2.1 Verkætlanarbyrjan og væntanir ..... 7
2.2 Teambuilding ..... 7
3.0 Kunning ..... 8
4.0 Verandi støða og møguleikar ..... 8
4.1 SWOT-greining ..... 8
4.2 Visión í mun til arbeiðssetning ..... 9
5.0 Tillagingar ..... 9
5.1 O-flokkur ..... 9
5.2 Tíma og lærarabýti ..... 9
5.3 Førleikamenning ..... 10
5.4 Fysiskar broytingar ..... 10
5.5 Útbúnaður ..... 14
5.6 Uttanumøkið ..... 14
5.7 Flutningur ..... 15
5.8 Aðrar tillagingar: ..... 15
6.0 Verksetingarætlan ..... 15
7.0 Arbeiðsbólkar og ummæli ..... 16
8.0 Kostnaðarmeting ..... 17
9.0 Aðrar viðmerkingar ..... 18
10.0 Fylgiskjøl ..... 18

**Samandráttur**

Verkætlnarbólkurin mælir til gera eina **haldgóða fyribilsloysn**, sum nøktar tørvin til ein nýggjur skúli verður bygdur.

| Tillagingar | Lýsing |
|---|---|
| **0-flokkur** | 0-flokkur verður settur á stovn |
| **Tíma og lærarabýti** | Skúlanir samstarva um tíma og lærarabýti |
| **Førleikamenning** | Førleikamenning innan samstarv, menning og undirvísing í 0-flokki |
| **Fysiskar broytingar** | Útbygging við pavilionum á uml. 300 fermetrar og broytingar í verandi bygningum á báðum skúlum |
| **Uttanumøkið** | Dagføring av uttanumøki á báðum skúlum |
| **Útbúnaður** | Dagføra telduútbúnaðin á báðum skúlum |
| **Flutningur av næmingum** | Seta skipaðan flutning av skúlanæmingunum í verk |
| **Annað** | Kanningar o.a. |
| **Íalt** | |

Samlaða íløgan verður mett til kr. 12.000.000,00

Tillagingarnar kunnu fremjast í verki áðrenn skúlaársbyrjan 2010/2011, men tað er ikki neyðugt at gera útbyggingina í Leirvík fyrrenn til skúlaársbyrjan 2011.

Útbyggingin gevur skúlunum eitt innandura skúlaumhvørvi við einum hjarta, sum skapar trivnað og gevur góðar fortreytir fyri samansjóðing og menning. Samstundis kann hetta umhvørvið nýtast til onnur endamál eftir skúlatíð s.s fundir, framførslur, o.a.

Broytingarnar í uttanumøkinum geva skúlunum fleiri møguleikar innan ítrótt, spøl o.a., samstundis sum at uttanumøki eisini kann nýtast til undirvísingarendamál.

0-flokkur gevur næmingunum í Eysturkommunu eitt gott byrjunargrundarlag.

Ein fyribilsloysn sum bert nøktar tørvin við skúlastovum ger at útbyggingin á skúlunum samalagt kann minka við 200  fermetrum, og svarar hetta til eina minking av samlaða kostnaðinum uppá 2.660.000 krónur. Værætlanarbólkurin metir ikki at ein slík loysn er nøktandi í nógv ár.

Verkætlanarbólkurin

Kommunuskrivstovan í Eysturkommunu, tann 2. november 2009

| | |
|---|---|
| ____________________ | ____________________ |
| Tórhild Bjarkhamar | Rúni Gaardbo |
| ____________________ | ____________________ |
| Joan Jacobsen | Jonleif Johannesen |
| ____________________ | ____________________ |
| Karin Jógvansdóttir | Erik Lervig |

## 1.0 Grundarlag

Býráðið í Eysturkommunu samtykti tann 22. apríl 2009 at gera bygnaðarbroytingar á skúlaøkinum í kommununi, sum skulu fremjast í verki í skúlaárinum 2010/2011.

### *1.1 Býráðssamtykt*

Býráðssamtyktin er soljóðandi:

Skúlabygnaðurin í Eysturkommunu verður skipaður av nýggjum, við at innskúling, t.e. forskúli og ella 1. til 3 flokkur verður í Leirvíkar skúla, og miðdeild, t.e. 4. til 7. flokkur verður í Gøtu skúla. Framhaldsdeildin heldur fram inni í Fuglafirði. Hendan broytingin verður framd í verkið skúlaárið 2010/2011, og fari verður undir at tillaga bygningarnar við tað sama.

### *1.2 Verkætlanarfyriskipan*

Fyri at skapa bestu fortreytir fyri bygnaðarbroytingini setti býráðsformaðurin ein stýris- og verkætlanarbólk, sum er mannaður við persónum, sum hava skil fyri tí sum skal gerast, og umboða teir bólkar, sum vara av skúlaøkinum. Hetta er gjørt fyri at tað skal gerast møguligt at fremja bygnaðarbroytingna í verki.

IR

o

Stýrisbólkurin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av arbeiðnum, og skal taka endaliga avgerð, um hvat tilmæli skal leggjast fyri býráðið.

### *1.3 Arbeiðssetningur hjá verkætlanarbólkinum*

Stýrisbólkurin setti upp ein arbeiðssetning til verkætlanarbólkin sum er soljóðandi:
Hvørjar tillagingar skulu gerast, soleiðis at undirvísingin kann skipast so skilagott sum gjørligt, í mun til býráðssamtyktina frá 22. apríl 2009.
Undirpunkt til arbeiðssetningin:

- ✓ Hvussu rúma vit broytingunum t.v.s. hvørjar fysiskar broytingar skulu gerðast
- ✓ Flutningur av næmingunum
- ✓ Førleikamenning (evt. skeið og annað)
- ✓ Tíma og lærarabýti
- ✓ 0-flokkur
- ✓ Útbúnaður og uttanumøkið
- ✓ Annað

Ítøkilga uppgávan hjá verkætlanarbólkinum er sostatt at seta upp hvørjar tillagingar eru neyðugar, og hvussu hesar skulu fremjast í verki.




### *1.4 Arbeiðs- og tíðarætlan*

Stýrisbólkurin sett eisini upp eina arbeiðs- og tíðarætlan fyri fyrsta partin av arbeiðnum hjá verkætlanarbólkinum, sum fevnir um ein ætlan fyri verkætlanan.
Í ætlanini fyri verkætlanini er arbeitt við tankaprosessini um uppskot til tillagingarnar, sum byrjaði tann 18. august 2009 og var liðugt og leggja fram fyri stýrisbólkinum tann 2. november 2009. Verkætlanarbólkurin leggur eisini fram eitt uppskot um, hvussu verksetingin skal fremjast við eini verksetingarætlan, sum tryggjar at neyðugu tillagingarnar verða framdar áðrenn skúlaársbyrjan 2010/2011.

Í tíðarskeiðnum frá august til november hevur stýrisbólkurin havt 4 fundir og verkætlanarbólkurin 9 fundir/arbeiðsdagar, íroknað byrjan og framløgu.

## 2.0 Byrjan

### *2.1 Verkætlanarbyrjan og væntanir*

Fyrsti fundurin í verkætlanarbólkinum varð saman við stýrisbólkinum tann 18. august 2009. Á hesum fundi varð grundarlagið fyri arbeiðnum gjøgnumgingið og viðgjørt. Harumframt vóru vantanirnar settar upp og viðgjørdar, fyri at tryggja at øll høvdu somu fatan av uppgávuni.

### *2.2 Teambuilding*

Verkætlanarbólkurin setti 27. august 2009 av til at arbeiða við teambuilding, hetta fyri at samansjóða bólkin og fyri at fáa nakað av íblástri til, hvussu ein tílíkur bólkur arbeiðir. Fyrst varð arbeitt við, hví tað er skilagott at arbeiða í einum bólki á henda hátt, og síðani varð arbeitt við styrkjum, veikleikum, møguleikum og hóttanum hjá verkætlanarbólkinum. At enda varð arbeitt við spælireglum fyri verkætlanarbólkin og úrslitið er eitt undirskiriva skjal við hesum spælireglum:

- ✓ At møta til tíðina og halda okkum til ásettu tíðirnar
- ✓ At sløkkja fartelefonina
- ✓ At verða opin og erlig
- ✓ At vit lurta eftir og rúma hvørjum øðrum
- ✓ At vísa virðing
- ✓ At halda avtalur og verða fyrireikað
- ✓ Vit tosa við og ikki um hvønn annan
- ✓ Vit vilja finna loysnir
- ✓ At kjakið er á einum sakligum støði
- ✓ Taka samanum

## 3.0 Kunning

Bygnaðarbroytingin er sera týdningarmikil fyri starvsfólkini á skúlunum, eins og fyri flestu borgarar í Eysturkommunu. Tískil er tað umráðandi at kunna um tilgongdina fyri samlaðu verkætlanina, eins og at kunna um úrslitið av projektarbeiðnum, áðrenn farið verður í holt við implementeringina.

31. august 2009 varð kunnað um tilgongdina fyri leiðslu og starvsfólkum á báðum skúlunum, og 7. oktober 2009 varð kunnað um tilgongdina á borgarafundi í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Kunningin fevndi um grundarlagið fyri arbeiðnum, tvs. býráðssamtykt, yvirskipaða tíðarætlan, verkætlanarfyriskipan, arbeiðssetning.
Ætlanin er at kunna um úrslitið av projektarbeiðnum á skúlunum báðum tann 9. november 2009, og at kunna borgararnar á borgarafundi primo desember 2009.

## 4.0 Verandi støða og møguleikar

### *4.1 SWOT-greining*

Fyri at skapa bestu bestu fortreytir at arbeiða útfrá, hevur verkætlanarbólkurin gjørt eina SWOT-greining í mun til skúlabygnaðin. SWOT-greiningin lýsir hvørjar styrkir, veikleikar, møguleikar og hóttanir eru í skúlabygnaðinum.

: skúlin ikki

### *4.2 Visión í mun til arbeiðssetning*

Verkætlanarbólkurin hevur sett upp eina visón í mun til arbeiðssetningin frá stýrisbólkinum. Visiónin lýsir úrslitið í mun til arbeiðssetningin, tvs. ynskiligu støðuna í framtíðini.

Visjón er skrivað í nútíð og gevur verkætlanarbólkinum eina leiðstjørnu, sum skapar fokus í mun til arbeiðið við tillagingunum.

**Visión:**
**Tillagingarnar eru greiðar og einfaldar og samstundis savnandi, mennandi og framálýtandi í mun til undirvísingina.**

## 5.0 Tillagingar

Í sambandi við tillagingarnar hevur verkætlanarbólkurin verið býttur í 2 arbeiðsbólkar, sum hvør sær hava arbeitt við einstøkum av tillagingunum. Tillagingarnar sum einstaki arbeiðsbólkurin er komin fram til, eru síðani lagdar fram fyri hinum bólkinum. Á tann hátt eru tillagingarnar viðgjørdar við støði í sjónarhorninum hjá øllum limum í verkætlanarbólkinum.

### *5.1 O-flokkur*

Í Føroyum er bert ein 0-flokkur settur á stovn, og er hann í Tórshavnar kommunu. Verkætlanarbólkurin hevur samskift við Tórshavnar kommunu og Runavíkar skúla har ætlanin varð at seta 0-flokk í verk. Hendan ætlan datt tó niðurfyri. Eisini hevur verkætlanarbólkurin samskift við Føroya Lærarafelag og Føroya Pedagogfelag um ætlanina.
Verkætlanarbólkurin mælir til, at 0 – flokkur verður settur á stovn í Eysturkommunu, at byrja skúlaárið 2010/2011. Tilmælið er grundað á royndirnar, ið aðrir skúlar hava gjørt á hesum økinum t. d. Santa Frans skúli í Tórshavn og skúlabólkar runt um í landinum.
Mett verður at 0-flokkur megnar á fullgóðan hátt, at tillaga næmingaundirvísingina, soleiðis at allir næmingar fáa eina lagaliga skúlabyrjan, og samstundis verða skjótari skúlabúnir. Styrkta samstarvi millum námsfrøðing og lærara fyribyrgir eisini møguligum byrjunartrupulleikum.

### *5.2 Tíma og lærarabýti*

Skipanin sum MMR tillutar tímar eftir hevur við sær, at tá ið skúlabygnaðurin í Eysturkommunu verður broyttur sæmbært býráðssamtyktini frá 22. apríl, fáa skúlanir uml. 10% færri tímar tillutaðar. Tí verður mælt til, at heita á MMR um at tilluta tímar til skúlanar í Eysturkommunu , sum um talan er um ein skúla + 10% í eini skiftistíð svarandi til 4-5 ár. Borgarstjórin og fyrstulærararnir sendu skriv dagført tann 23. oktober til MMR.
Í sambandi við tíma og lærarabýti verður eisini mælt til at, fyrstulærararnir samstarva um tíma og lærarabýti, og at fyrstulærarnir í størst møguligan mun ganga ynskjunum frá lærararnum á møti.

### *5.3 Førleikamenning*

Verkætlanarbólkurin metir at tað er skilagott við nakað av førleikamenning, í sambandi við bygnaðanarbroytingarnar.

**Almenn førleikamenning**
innan samstarv og menning fyri leiðslur og lærarar, soleiðis at øll kunnu lyfta uppgávurnar í felag. Her verður eisini hugsa um samstarv og menning millum skúla og heim, tá ið frástøðan til skúlan verður longri.

**Faklig førleikamenning**
innan undirvísing í 0-flokki fyri lærarar og pædagogar. Áðrenn førleikamenningin verður framd er tørvur á at skúlin og námsfrøðingar seta seg inn í tær royndir sum eru gjørdar við 0-flokki í Føroyum og í grannalondunum. Á tann hátt verður tryggja, at Eysturkommuna byggir víðari á bestu royndir innan 0-flokk.

**Faklig førleikamenning**
innan byrjanarundirvísing og miðdeild fyri lærarar.

### *5.4 Fysiskar broytingar*

Verkætlanarbólkurin mælir til at hesar broytingar verða gjørdar á verandi skúlum.
**Gøtu skúli (verandi skúli hevur 6 skúlastovur)**

| Árgangur | Næmingatal | Flokkatal 2010/2011 |
|---|---|---|
| **4** | 40 | 2 |
| **5** | 28 | 2 |
| **6** | 27 | 2 |
| **7** | 40 | 2 |

Í 2010 er tørvur á 2 skúlastovum afturat.

Harumframt er tørvur á goymsluhøli og hølum til handarbeiði, sang og serligan tørv.

Mælt verður til at fáa til vega 2 skúlastovur, sum eina pavilion loysn, norðanfyri skúlan, og at 29-skúlin verður nýttur til handarbeiði, umframt at verandi (1974-skúlin) verður broyttur nakað soleiðis at læraraumstøðunar verða betri, og at tað verða 2 skúlastovur, umframt stovur til alis- og evnafrøði, sang heimkunnleika og serligan tørv.

Skitsa av út og umbygging í Gøtu:



**Leirvíkar skúli (verandi skúli hevur 6 skúlastovur)**

| Árgangur | Næmingatal | Flokkatal 2010/2011 |
|---|---|---|
| 0 | 26 | 1 |
| 1 | 25 | 1 |
| 2 | 32 | 2 |
| 3 | 18 | 1 |

Í 2011 er tørvur á 1 skúlastovu afturat, og í 2013 er tørvur á 2 skúlastovum afturat í mun til í dag. Hølistørvurin kann gera seg galdandi longu í 2010, um tað verður 1 næmingur fleiri í 0 flokki.

Mælt verður til at fáa til vega 2 skúlastovur, sum eina pavilion loysn, soleiðis at hølistørvurin er nøktaður í mun til næmingatølini í 2011 og 2013.

Harumframt er ynskiligt at fáa hesi viðurskifti gjørd áðrenn skúlaársbyrjan 2010:

- ✓ Skáp til skiftiklæðini hjá næmingunum uttanfyri stovuna (pláss til skógvar/stivlar hjá næmingunum)
- ✓ Møguleiki at turka vátu klæðini
- ✓ Umvæling av vesum
- ✓ Váthøli til at skola/vaska og goyma ymiskt, sum hartil hoyrir
- ✓ Brenniovnur setast uppaftur
- ✓ At fáa betri arbeiðisumstøður til lærararnar

Skitsa av útbygging í Leirvík:



### *5.5 Útbúnaður*

Mælt verður til at útvega øllum lærarum nýggjar arbeiðsteldur, og gera tráðleyst net í Gøtu skúla umframt at fáa til vega eina mobila teldustovu í Gøtu skúla.

### *5.6 Uttanumøkið*

Mælt verður til at broytingar verða gjørdar í skúlans uttanumøki. Bæði í Leirvík og í Gøtu.

Broytingarnar skulu verða gjørdar á slíkan hátt, at allir næmingar, sum nú koma at ganga í hesum skúlum kunnu halda fríløtur í einum tryggum og rørslumennandi og samstundis huganaligum umhvørvi. Umhvørvið skal tillagast soleiðis, at allir næmingar fáa góðar umstøður.

**Uttanumøkið í Leirvík.**
Útiøkið verður býtt upp eftir aktivitetum og ikki aldursbýtt.
Mælt verður til at varðveita ovara spælipláss til fótbólt (onnur helvtin) og onnur bóltspøl (hin helvtin), og at á niðara spæliplássi verður eitt sindur av graslíki á ovara partinum varðveitt, har møguleiki kann vera at hoppa elastikk o.a. Restin av graslíkinum skal av. Tá koma vit niður á asfalt, har vit kunnu mála ymisk spøl niður á asfaltið so sum paradís, landamark o.a.
Somuleiðis verða nøkur spøl málað niður á asfaltið undir hálvtakinum.
Grasøkið niðanfyri skúlan verður verandi sum tað er. Har verða settir nakrir steinar runt um á økinum. Somuleiðis reiggjur, sandkassar, stabbar til javnvág o.a. nakrar "Grúgvur" verða eisini settar á økið. Harumframt verður eitt klatriøkið við klatriveggi, ymisk klatristativ, steinar o.a. gjørt.

**Uttanumøkið í Gøtu.**
Mælt verður til at partar av "Jacobæusætlanini" verður gjørd. At økið niðan ímóti svimjihøllini verður eitt friðarligt og vakurt øki. Har verða sett borð og blómukassar. Møguliga verða nakrir skilaveggir settir upp undir hálvtakinum.
Eitt sindur longri niðri verða spøl mála niður á asfaltið. Vøllurin verður varðveittur, men ein nýggjur vøllur verður gjørdur norðanfyri skúlan.
Á tað grøna økið niðanfyri skúlan verða nakrir steinar lagdir, og nøkur borð og nakrar "Grúgvur" settar upp. Atgongdin til tað grøna økið skal vera góð og natúrlig, tí má tann lítli vøllurin takast burtur.

### *5.7 Flutningur av næmingum*

Mælt verður til at hava skipaðan flutning av skúlanæmingunum í Eysturkommunu. Tilmælið hevur til endamáls at flyta skúlanæmingar á tryggasta, smidligasta og besta hátt.

Í Eysturkommunu verða uml. 240 næmingar skúlaárið 2010 – 2011 við 0 – flokki.
Talið av næmingum, ið skulu koyrast í bussi er:

| | |
|---|---|
| Flokkar 0 til 3 | 59 næmingar úr Gøtu til Leirvíkar |
| Flokkar 4 til 7 | 69 næmingar úr Leirvík til Gøtu |

Verkætlanarbólkurin mælir til:

- ✓ At ansing er í bussinum til skúlan ( møguliga frá skúlanum )
- ✓ At ansing er í skúlunum áðrenn kl. 8.00
- ✓ At allir næmingarnir møta kl. 8.00
- ✓ At allir næmingarnir sleppa heim eftir skúlatíð
- ✓ At ansing er í skúlunum aftan á skúlatíð ( t.v.s. til næmingarnir eru í bussinum )
- ✓ At allir næmingarnir í øllum bygdunum í Gøtu fáa tilboð um at koyra í bussi
- ✓ At ikki ov langt er ímillum steðgistøðini
- ✓ At trygdin í bussinum er í lagi
- ✓ At gjørd verður ein tørvs og góðskukanning av flutninginum fyri at lýsa veruliga tørvin

### *5.8 Aðrar tillagingar:*

Bygnaðarbroytingarnar í skúlunum koma at ávirkað aðrar stovnar í Eysturkommunu. Frítíðarheimini og barnagarðarnir koma at merkja hesa broyting, og tískil eigur at verða kanna nærri, um tað er skilagott at skipa eitt tættari samstav millum skúlan frítíðarheimini og barnagarðanar. Verkætlanarbólkurin mælir til:

- At frítíðarskúlin og skúlin samskipa síni tilboð
- At frítíðartilboðið verður frá 0. til 3. flokk
- At eitt hølið verður nýtt til frítíðarskúlatilboð fyri allar næmingarnar í kommununi.

## 6.0 Verksetingarætlan

Verkætlanarbólkurin hevur sett upp eina verksetingarætlan fyri nær ymisku tillagingaranr skulu fremjast í verki í tíðarskeiðnum frá november 2009 til august 2010. Í hesum sambandi skulu arbeiðsbólkar setast innan ymsku tillagingarnar, soleiðis at tað verður tryggja at einstøku tillagingarnar verða framdar av fólki, sum hava skil fyri tillagingunum, sum skulu fremjast. Eit nú kann nevnast, at innan 0-flokk skulu námsfrøðingar og lærarar setast til gera eins skipan fyri undirvísnigna í 0-flokki, og innan fysiskar broytingar fer tekniska umsiting í Eysturkommunu at prosjektera út- og umbýggingina í samráð við leiðslu og starvsfólk á skúlunum.

**7.0 Arbeiðsbólkar og ummæli**

Mælt verður til at skipað arbeiði við tillagingunum í arbeiðsbólkar, sum vísa til verkætlanarbólkin, og at arbeiðsbólkarnir skulu senda áhugaðum úrslitini til ummælis, soleiðis at Eysturkommuna á tann hátt tryggjar, at allar tillagingar frá byrjan verða framdar á besta hátt. Verkætlanarbólkurin setur upp karmnarnar fyri ymisku arbeiðsbólkarnar, og skal tryggja at arbeiði verður framt innan karmarnar.

| Tillagingar | Arbeiðsbólkur/ábyrgd | Ummæli |
|---|---|---|
| **Førleikamenning til 0-flokk** | Ein lesivegleiðari úr hvørjum skúla, umboð fyri barnagarðin í Gøtu og frítíðarskúlan í Leirvík | Starvsfólkini á skúlunum, barnagarðinum í Gøtu og frítíðarskúlanum í Leirvík |
| **Fysiskar broytingar og uttanumøkið** | Teknska umsiting í Eysturkommunu og leiðararnir á skúlunum | Starvsfólk á skúlunum og skúlastýrið |
| **Útbúnaður** | Leiðararnir á skúlunum og eitt læraraumboð frá hvørjum skúla | Starvsfólk á skúlunum |
| **Flutningur** | Leiðararnir í skúlunum og umboð fyri barnagarðin í Gøtu og frítíðarskúlan í Leirvík | Starvsfólkini, sum broytingarnar raka, skúlastýri og avvarandi foreldrabólkar |
| **0-flokkur** | Ein lesivegleiðari úr hvørjum skúla, umboð fyri barnagarðin í Gøtu og frítíðarskúlan í Leirvík | Starvsfólk á skúlunum, foreldrabólkar , umframt Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Mentamálaráðið |
| **Tíma og lærarabýti** | Leiðararnir á Gøtu og Leirvíkar skúla, eitt læraraumboð frá hvørjum skúla | Starvsfólk á skúlunum |
| **Samstav millum skúlan frítíðarheimini og barnagarðanar** | Leiðararnir á skúlunum, frítíðarskúlunum og barnagarðinum | Starvsfólkið, sum boytingarnar raka, og foreldrabólkarnir í frítíðaransingini |

**8.0 Kostnaðarmeting**

Verkætlanarbólkurin hevur gjørt eina kostnaðarmeting, sum er sett upp í mun til tillagingar í tilmælinum. Metingin innan fysiskar tillagingar og uttanumøkið er fingin til vega frá teknisku umsiting í Eysturkommunu.

Aðrar kostnaðarmetingar eru gjørdar av verkætlanarbólknum við støði í einum besta boð í mun til tað sum fyriliggur.

Samlaða íløgna verður umleið kr. 12.000.000,00

### 9.0 Aðrar viðmerkingar

Verkætlanarbólkurin mælir til at leggja tilmæli uttan fylgiskjøl á heimasíðuna hjá Eysturkommunu, tá ið býráðið hevur viðgjørt og tikið avgerð um tilmæli.

### 10.0 Fylgiskjøl

| | |
|---|---|
| Skjal 1 | 0-flokkur í Runavíkar skúla |
| Skjal 2 | Kostnaður 0-flokkur í Tórshavnar kommunu |
| Skjal 3 | Lønarútreiðslur til 0-flokk í Tórshavnar kommunu |
| Skjal 4 | Fakfeløgini um 0-flokk |
| Skjal 5 | Verksetingarætlan |
| Skjal 6 | Skitsa av uttanumøkinum í Gøtu skúla |
| Skjal 7 | Skitsa av uttanumøkinum í Leirvíkar skúla |
| Skjal 8 | Tíðarætlan fyri út- og umbyggingar |

Verkætlanarbólkurin hevur eisini fingið til vega tilfar um undirvísingar- og lesiætlan fyri 0-flokk og uppskot til reglur fyri forskúlan í Tórshavnar kommunu. Framløgur eru eisini gjørdar ísv. fundir og arbeiðsdagar hjá hjá stýris- og verkætlanarbólkinum í tíðarskeiðnum. Grunda á at talan er um rúgvusmikið tilfar er hetta ikki hjálagt í frágreiðingini, men er til skjals í skúlamálinum hjá Eysturkommunu.

# Skúlaspírin

# í

# Eysturkommunu

Á summarmála 2010

**Innihald**


Samandráttur ..... 21
1.0 Grundarlag ..... 23
  1.1 Verkætlanarfyriskipan ..... 23
  1.2 Endamál og arbeiðssetningur ..... 24
  1.3 Arbeiðs- og tíðarætlan ..... 24
2.0 Byrjan ..... 24
  2.1 Byrjan og væntanir ..... 24
  2.2 Teambuilding ..... 25
3.0 Verandi støða og møguleikar ..... 25
  3.1 SWOT-greining ..... 25
  3.2 Visión í mun til arbeiðssetning ..... 27
4.0 Arbeiðsháttur og tvørfakligt samstarv ..... 27
  4.1 Arbeiðsháttur ..... 27
  4.1 Tvørfagligt samstarv ..... 27
5.0 Skipan av 0. flokki ..... 29
  5.1 Áðrenn farið verður í 0. flokk ..... 29
  5.2 Árið í 0.flokki ..... 30
  5.3 Skipan av degnum ..... 31
  5.4 Ítøkiligt innihald í degnum ..... 32
  5.5 Setanarviðurskifti og normering ..... 33
6.0 Námsætlanir og evni ..... 34
  6.1 Mál og málberingarhættir ..... 34
  6.2 Talfatan ..... 35
  6.3 Náttúran ..... 35
  6.4 Tónleikur og rørsla ..... 36
  6.5 Kropslig menning ..... 36
  6.6 Handaverk og list ..... 37
7.0 Amboð, arbeiðshættir og eftirmetingar ..... 38
  7.1 Amboð at nýta innan ymisku námsætlanirnar ..... 38
  7.2 Arbeiðshættir ..... 38
  7.3 Mál- og eftirmetingaramboð ..... 39
  7.4 Støðumet ..... 39
8.0 Kunning ..... 40

## Samandráttur

Við visiónini, **við leiki og læru er næmingurin búgvin til skúlan**, metir arbeiðsbólkurin, at 0. flokkur, sum arbeiðsbólkurin mælir til at nevna **Skúlaspíran**, gevur næminginum eitt breitt og gott grundarlag, sum samstundis ger, at næmingurin fær eina lagaliga byrjan í 1. flokki.

Tvørfakliga samstarvið millum námsfrøðing og lærara hevur við sær, at vitan og royndir innan kreativitet og tað fakliga verða samantvinnaðar, og gevur hetta nýggjar og øðrvísi møguleikar fyri læring.

Uppskotið til Skúlaspíran er nágreiniliga býtt í partar, sum hava við sær eina málrættaða skipan, ið tryggjar, at tað fæst sum mest burturúr, eins og at skipanin eisini skapar tryggleika fyri næmingar, foreldur og starvsfólk.

Tær 6 námsætlanirnar fyri Skúlaspíran geva næminginum eina breiða fatan av grundleggjandi fyribrygdum, sum eru avgerandi fyritreytir fyri, at hvør einstakur næmingur fær møguleika fyri at fáa eina lagaliga skúlabyrjan í 1. flokki.

Fyri at tryggja hvørjum einstøka barninum eitt mennandi og læruríkt ár í Skúlaspíranum er umráðandi, at mett verður um málsligan-, sosialan- og kropsligan førleika hjá barninum áðrenn byrjan.

Í Skúlaspíranum verða sett týðulig og ítøkilig mál fyri hvønn einstakan næming, eins og mál eisini verða sett fyri allan flokkin. Ein meting við ársenda eigur at vera nágreinilig og eigur at nýtast sum hent amboð hjá læraranum, sum tekur ímóti næminginum í 1. flokki.

Arbeiðsbólkurin vónar at tikið verður væl ímóti tilmælinum fyri Skúlaspíran og er ikki í iva um, at Skúlaspírin er eitt stig á rættari leið til ein betri skúla í Eysturkommunu.

**Skipan av Skúlaspíranum**



Arbeiðsbólkurin fyri Skúlaspíran

Kommunuskrivstovan í Eysturkommunu á summarmála 2010

| | |
|---|---|
| Hallbjørg Eliassen | Sigvør Gregersen |
| Ingun Joensen | Julia Lamhauge |
| Hanna Olsen | Marta Thomsen |

**Karin Jógvansdóttir**

# 1.0 Grundarlag

Á býráðsfundi 9. novembur samtykti Eysturkommuna einmælt tilmælið frá verkætlanarbólkinum, ið mælir til, at 0. flokkur verður settur á stovn skúlaárið 2010/2011

### *1.1 Verkætlanarfyriskipan*

Fyri at skapa bestu fortreytir fyri hesi broyting verður settur ein arbeiðsbólkur, íð skal koma við námsfrøðiligum og fakligum innihaldi til 0. flokk.

Í arbeiðisbólkin eru vald fólk við førleika og áhuga innan økið, og sum umboða teir bólkar, sum vara av. Eitt umboð fyri verkætlanarbólkin skipar fundirnar hjá arbeiðisbólkinum og stýrir arbeiðinum á ein slíkan hátt, at endamálið verður nátt. Arbeiðisbólkurin finnur loysnir í mun til arbeiðsetningin og er ein av trimum arbeiðsbólkum, sum eru settir í sambandi við broytingarnar í skúlabygnaðinum í Eysturkommunu.

ólkur:
millum
rheim og
arð

### *1.2 Endamál og arbeiðssetningur*

**Endamál**

Endamálið er at skapa eina lagaliga skúlabyrjan fyri næmingarnar og at styrkja samstarvið millum námsfrøðing og lærara.

**Arbeiðssetningur**

Arbeiðssetningurin er hesin: Hvussu skal námsfrøðiliga og fakliga innihaldið fyri 0. flokk í Eysturkommunu skipast?

Undirpunkt til arbeiðssetningin:

- ✓ hvussu kann tvørfakliga samstarvið millum læraran og námsfrøðingin gagna næminginum/barninum best?
- ✓ hvussu kann/skal skúladagurin skipast? (tímar, innihald, fyrireiking, virksemisætlan og setanarviðurskifti)
- ✓ hvussu skal námsætlanin fyri 0-flokk ljóða?
- ✓ hvørji evni skal dentur leggjast á í 0 - flokki?
- ✓ Hvørji amboð skulu brúkast í 0-flokki (Tras kanningar – einstaklinga námsætlan o.a.)
- ✓ Annað

### *1.3 Arbeiðs- og tíðarætlan*

Verkætlanarbólkurin setti eisini upp eina arbeiðs- og tíðarætlan fyri arbeiðið. Arbeiðið byrjaði 8. januar og var liðugt á summarmála 2010.

Í tíðarskeiðnum hevur arbeiðsbólkurin havt 9 fundir/arbeiðsdagar, íroknað byrjan og framløgu.

## 2.0 Byrjan

### *2.1 Byrjan og væntanir*

Fyrsti fundurin í arbeiðisbólkinum varð 8. januar 2010. Á hesum fundi varð grundarlagið fyri arbeiðið gjøgnumgingið og viðgjørt. Harumframt vóru væntanirnar settar upp og viðgjørdar fyri at tryggja, at øll høvdu somu fatan av uppgávuni.

### *2.2 Teambuilding*

12. januar 2010 varð tíð sett av til at arbeiða við teambuilding, hetta fyri at samansjóða bólkin og fyri at fáa nakað av íblástri til, hvussu ein tílíkur bólkur arbeiðir. Fyrst varð arbeitt við, hví tað er skilagott at arbeiða í einum bólki á henda hátt. Arbeitt varð m.a. eisini við spælireglum fyri arbeiðisbólkin. Úrslitið er eitt undirskrivað skjal við hesum spælireglum:

- ✓ At øll halda fokus á evnið skúlaspíran
- ✓ At vit øll hava tað gott og stuttligt í steðginum (gaman og álvara hond í hond)
- ✓ At vit altíð fara glað heim við góðum móti um at møta aftur næstu ferð (at vit enda við at reinsa luftina)
- ✓ At møta til ásetta tíð og halda tíðirnar
- ✓ At verða opin, erlig og álítandi
- ✓ At vit virða ymisku hugsanirnar í toyminum (pláss fyri ymiskleikanum)
- ✓ At vit tosa við hvønn annan (samskifta/tosa/heilsa)
- ✓ At siga frá og góðtaka, at hini siga frá
- ✓ At møta væl fyrireikað

## 3.0 Verandi støða og møguleikar

### *3.1 SWOT-greining*

Fyri at skapa bestu fortreytir at arbeiða útfrá, hevur arbeiðisbólkurin gjørt eina SWOT-greining í mun til toymið og eina SWOT-greining í mun til Skúlaspíran. SWOT-greiningarnar lýsa hvørjar styrkir, veikleikar, møguleikar og hóttanir eru í tvørfagliga samstarvinum og í mun til Skúlaspíran í Eysturkommunu.

## SWOT-greining fyri toymi

Eysturkommuna

### Strength (Styrkir)

- Ymiskir førleikar
- Nógvar royndir
- Áhugað í økinum
- Ymiskir fakbólkar
- Arbeiða við ymiskum aldursbólkum
- Ymsastaðni frá (Gøta/Leirvík)

### Weakness (Veikleikar)

- Manglandi praktisk vitan um 0. flokk
- Manglandi vitan um dagliga arbeiði hjá hvørjum øðrum
- Eitt kyn
- Byrja á berum

### Opportunities (Møguleikar)

- Síggja fakligar førleikar og møguleikar hjá hvørjum øðrum
- Broyta hugburð hjá øðrum
- Skapa nakað nýtt eftir føroyskum fortreytum
- Verða fyrimynd og gera eitt grundleggjandi arbeiði
- Tað ber til at ymiskir fakbólkar fáa nakað gott burturúr

### Threat (Hóttanir)

- Negativ ávirkan á toymi uttanifrá
- Fakfeløgini
- Tíðarætlanin sum heild
- Negativur hugburður útifrá
- Fakfeløg og MMR hava ikki greiðar linjur
- Niðursett arbeiðstíð hjá onkrum starvsfólkum

savnandi opin og vinarlig framsøkin

www.eysturkommuna.fo

## SWOT-greining fyri 0. flokk

Eysturkommuna

### Strength (Styrkir)

- Spæl og læring hond í hond
- Lættari af lofta einstaka næminginum
- Betri møguleika at síggja ta heila barnið
- Næmingurin fær lagaligari og tryggari skúlabyrjan
- Menna fakliga førleikan hjá einstaka barninum

### Weakness (Veikleikar)

- Fysiskir karmar
- Ymiska fatan um barnið er tilreiðar at fara í skúla
- Fakbólkar fara at mótarbeiða hvørjum øðrum
- Avmarka tað fría spælið
- Møtiskylda/samband við heimini
- Barnið er ikki skúlabúgvið

### Opportunities (Møguleikar)

- Skapa ein bleytari yvirgang millum barnagarð og skúla
- Lættari at differentiera undirvísingina
- Spæla seg til læring
- Skipa dagin annarleiðis
- Barnið kann mennast í mun til skúlabyrjan í 1. flokki

### Threat (Hóttanir)

- Fakfólk sum ikki góðtaka samstarv millum bólkarnar og fakligu førleikarnar hjá hvørjum øðrum
- Ófaklærd starvsfólk
- Broytt normering (børnini fáa minni kontakt við tey vaksnu)

savnandi opin og vinarlig framsøkin

www.eysturkommuna.fo

### *3.2 Visión í mun til arbeiðssetning*

Arbeiðisbólkurin hevur sett upp eina visión. Visiónin lýsir ynskiliga úrslitið í mun til arbeiðssetningin, tvs. ynskiligu støðuna í framtíðini.

Visiónin er skrivað í nútíð og gevur arbeiðisbólkinum eina leiðistjørnu, sum skapar fokus í mun til arbeiðið viðvíkjandi Skúlaspíranum.

**Visión:**
**Við leiki og læru er næmingurin búgvin til skúlan**

## 4.0 Arbeiðsháttur og tvørfakligt samstarv

### *4.1 Arbeiðsháttur*

Í sambandi við einstøku punktini í arbeiðssetninginum hevur arbeiðsbólkurin verið býttur í 2 bólkar, sum hvør sær hava arbeitt við uppskotum til loysnir. Úrslitini, sum einstaki bólkurin er komin fram til, eru síðani løgd fram fyri hin bólkin. Á tann hátt eru endaligu loysnirnar viðgjørdar við støði í sjónarhorninum hjá øllum limum í arbeiðsbólkinum.

### *4.1 Tvørfagligt samstarv*

Leikluturin hjá námsfrøðinginum í dag er at menna barnið persónliga og sosialt. At læra tey at vera í einum bólki og at virða hvønn annan.

- ✓ At læra tey at lurta
- ✓ At duga at siga frá
- ✓ At menna talumálið
- ✓ At gera barnið skúlabúgvið
- ✓ At menna almennu vitanina hjá barninum

Harafturat er uppgávan hjá námsfrøðinginum at geva barninum so nógvar upplivingar, sum gjørligt.

**Styrkirnar hjá námsfrøðinginum og læraranum í mun til Skúlaspíran:**

- ✓ At leggja dent á at styrkja sosialu førleikarnar hjá børnunum
- ✓ At duga at skapa undirvísingarsituatiónir og
- ✓ at skapa fokus og at fáa øll/tann einstaka við
- ✓ At síggja og kenna væl tað einstaka barnið í hópinum
- ✓ At duga at differentiera undirvísing í tráð við menningarstigi hjá barninum
- ✓ At hugsa fjølbroytt/kreativt í mun til umstøðurnar hjá barninum
- ✓ At vita hvat verður væntað av barninum í 1. flokki og hava fakligu vitanina
- ✓ At hava vitan um munin millum gentur og dreingir í aldursbólkinum og um frávik frá vanligu menningini
- ✓ At kenna hvør atburður er neyðugur fyri at innlæring kann fara fram
- ✓ At hava yvirlit yvir stóra fjøld

Námsfrøðingurin og lærarin koma at taka sær av ymiskum uppgávum í mun til menningina hjá barninum/næminginum.

| **Námsfrøðingurin** | **Lærarin** |
|---|---|
| Kemur í <u>høvuðheitum at taka sær av tí kreativa partinum</u> - í sambandi við tann fakliga partin í 0. flokki<br><br>Við eygleiðingum og kanningum finna út av, hvussu næmingurin lærir best<br><br>At lofta teimum, ið ikki fylgja vanligu undirvísingini | Kemur í <u>høvuðsheitum at taka sær av tí fakliga partinum</u>, sum grundarlag undir fakliga partinum í 1. flokki |

Tað er sera týdningarmikið, at hesir báðir partar - tann fakligi og tann kreativi – verða knýttir saman og at niðurfesta vitanina hjá hvørjum øðrum. Tí kunnu nevndu styrkir og royndir hjá lærara og námsfrøðingi geva børnunum eitt breitt og gott grundarlag undir skúlabyrjanini.

At samantvinna hesar royndir og styrkir krevur, at starvsbólkarnir eru tilvitaðir um sínar serligu førleikar, og at teir samstarva um at fyrireika tímarnar, børnini/næmingarnar í skúlaspíranum. Starvsbólkarnir arbeiða á jøvnum føti.

## 5.0 Skipan av Skúlaspíranum

Skipanin er býtt upp í hesar partar: Áðrenn farið verður í Skúlaspíran, árið í Skúlaspíranum, skipan av degnum og ítøkiligt innihald í degnum.

### *5.1 Áðrenn farið verður í Skúlaspíran*

Gøtu- og leirvíksnæmingar hittast í umhvørvinum, tey koma at ganga í



### *5.2 Árið í Skúlaspíranum*

**Hvussu skal árið skipast**

**Fakliga verður arbeitt við spakuligari byrjan. Meira kemur uppá so hvørt. Soleiðis verður arbeitt við málmenningin og talfatan frá byrjan.**

*aug*:

foreldrakunning fyri fyrsta skúladag skúlin byrjar – fyrsti dagur er hátíðarligur – dentur lagdur á eygleiðing, samansjóðing, sosialisering, spakuliga innføring í skúlanormar, upplestur, sangspøl, tekning, útivirksemi millum fjals og fjøru

*sept:*

kanning av málsliga menningarstøðinum hjá einstaka næminginum,

rím og ramsur, klapp, ljóð, bókstavabyrjan, smærri uppgávur

*okt:*

bókstavir, ljóð

evni: fjall og tað, íð hartil hoyrir

*nov*:

byrjanarljóð, endaljóð, arb. við ávísum evni

*des:*

málmenningararb. heldur fram

jólini seta dám á mánaðin

*jan*:

støðumet – málsliga støðið, talfatan

*feb:*

føstan, skjaldur, kvæði

*mars:*

tjaldrið, várið

*apríl:*

páskir, lembing

*mai:*

merkt av uttanduravirksemi

foreldraviðtala

*juni:*

úti virksemi

longri útferð

Í várhálvuni: Vitja verandi 1.flokk

Gjøgnum árið: Vitja støð og arbeiðspláss

### *5.3 Skipan av degnum*

| | |
|---|---|
| 8.00 – 11.30 Børnini eru í skúla, so tey fylgja tí vanliga degnum hjá 1. – 3. flokki | |
| Tímatalvan | |
| 1 tími 30 min. | Leikur og læra |
| 30 min. | Ein partur av fríkorterinum saman við hinum børnunum í skúlanum |
| 1 tími 30 min. | Leikur og læra |

**Skúlaspírin skal hava møtiskyldu, tí tað er ein stórur partur av tí at ganga í skúla**

### *5.4 Ítøkiligt innihald í degnum*

Tað verða fýra lektiónir, tvær og tvær saman frá kl. 8.00 - 11.30.

Dagarnir kunnu hava ymiska skipan og innihald, alt eftir hvussu leingi børnini hava gingið í skúla, árstíðini og evninum, arbeitt verður við.

| | Modell 1 | Modell 2 | Modell 3 |
|---|---|---|---|
| Kl. 8.00 | Næmingarnir hava morgunsang saman við hinum børnunum í skúlanum | Næmingarnir hava morgunsang saman við hinum børnunum í skúlanum | Næmingarnir hava morgunsang saman við hinum børnunum í skúlanum |
| Kl. 8.15 – 8.45 | Morgunsamling: Prát og kunning um dagin, arbeiða við at samrøða og lurta | Morgunsamling: Prát og kunning um dagin, arbeiða við at samrøða og lurta | Úti |
| Kl.. 8.45 | Undirvísing/ Fakligt innihald<br><br>Hvør dagur skal innihalda málsligt virksemi og fyrireikandi lesivirksemi, sang og rørslu, talfatan og virksemi úti/inni | Úti | |
| Kl. 9.10 | Matarsteðgur – frukt<br><br>leggja dent á matpakkan – røklaskipan | | |
| Kl.9.30 – 10.00 | Fríkorter | | |
| Kl.10.00 | Framhaldandi arbeiði frá fakliga partinum fyrr á degnum<br><br>(meir verkligt) og samanumtøka | Aftur í skúla at viðgera útidagin | |
| Kl.11.00 | Leikur við læruinnihaldi ella frítt spæl<br><br>Hvør dagur endar við eini samlig (takk fyri í dag) | | Aftur í skúla at viðgera útidagin |

### *5.5 Setanarviðurskifti og normering*

Arbeiðsbólkurin mælir til, at námsfrøðingar og lærarar framhaldandi verða settir og løntir eftir galdandi sáttmálum. Tó mælir arbeiðsbólkurin til, at tíð til fyrireiking hjá lærarum og námsfrøðingum verður gjørd eftir somu avtalu, sum lærararnir hava. Harumframt eigur toymið, sum skal arbeiða við Skúlaspíranum eisini at hava neyðuga tíð til at fyrireika árið, eins og tíð til at samstarva gjøgnum árið.

Arbeiðsbólkurin mælir til hesa arbeiðs- og tíðarætlan, og at fyrsta árið verður eitt royndarár, sum verður eftirmett, og at neyðugar tillagingar verða gjørdar við støði í eftirmetingini.

| Mai – juni 2010 | August – apríl 2010-2011 | Apríl –juni 2011 |
|---|---|---|
| Toymið um komandi Skúlaspíra verður sett og fyrireikar endaliga innihaldið | Toymið um Skúlaspíran hevur regluligar fundir eina ferð um vikuna saman við leiðsluni | Toymið um Skúlaspíran eftirmetir og ger møguligar tillagingar |

**Normering**

Í Skúlaspíranum verða 26 næmingar skúlaárið 2010/11. Arbeiðsbólkurin mælir til, at tað verða námsfrøðingar og lærarar, sum samstarva um Skúlaspíran.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at næmingarnir verða í tveimum bólkum, við í mesta lagi 18 næmingum í hvørjum bólki, soleiðis at tað verða ein lærari og ein námsfrøðingur til hvønn bólk.

## 6.0 Námsætlanir og evni

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er av týdningi, at námsætlanirnar stuðla undir visiónina og samantvinna tað, sum vit í dag kenna frá barnagarðinum og skúlanum.

Mælt verður til hesar 6 námsætlanirnar:

- ✓ Mál- og málberingarhættir
- ✓ Talfatan
- ✓ Náttúran
- ✓ Tónleikur og rørsla
- ✓ Kropslig menning
- ✓ Handaverk og list

### *6.1 Mál og málberingarhættir*

Endamálið er at geva øllum børnum bestu fortreytir fyri fyrstu lesingini.

Talaða málið

- Læra at luttaka í samtalu – bæði við at lurta virkið og tosa.
- Skilja, at talumálið hevur ymisk brigdi, sum eru knýtt at teimum umstøðum, barnið er í.
- Menna orðatilfeingið hjá barninum
- Læra at greiða frá egnum upplivingum og at endurgeva t.d. søgur

Skriftmálið

- At fáast við lesifyrireikandi virksemi
- Hoyra/"lesa" søgur og vera virkin í samskiftinum
- Royna seg við rímum, ljóðum, setningum og orðum
- Fáa vitan um bókstavir – navn, ljóð og snið í einum funktionellum samanhangi
- Arbeiða við spæliskriving

### *6.2 Talfatan*

- duga at telja upp í 100
- læra at fata, at eitt tal og ein ávís mongd hoyra saman
- fáa talrytmu inn, t.e. at telja og fyrihalda seg til ítøkiliga mongd og samstundis. Dømi: telja knappar og siga tølini samstundis
- læra um tøl og spæla samstundis rørsluliga (hoppa á teppi ella tekning)
- arbeiða við talfatanarspølum
- skapa tøl við rørslu og ymsum tilfari, samstundis sum arbeitt verður við at binda tal og mongdarfatan saman
- arbeiða við ymsum geometriskum skapum
- arbeiða við klokkuni
- gera roknisøgur
- arbeiða verkliga og samrøða um støddir og rúmd

### *6.3 Náttúran*

Børnini eiga at gerast tilvitað um veðurlag og árstíðina, tey eru í. Týdningarmikið er at knýta hetta tilvit til praksis í dagligdegnum.

<u>Gerast tilvitað um árshjólið</u>

- Mánaðir/árstíðir
- Ljós/myrkur
- Lýtt/kalt
- Vindur/stilli
- Sprettir/følnar
- Støðufuglar/flytifuglar
- Lembing/slakt

<u>Børnini skulu læra at virða náttúruna</u>

- Læra úthaldni, tá tey eru náttúruni
- Fara væl um umhvørvið í tí dagliga
- Burturkast/endurnýtsla

Túrar og vitjanir

Fjøra, sandur, hagi, áin, fjós o.s.fr.

Týdningarmikið er, at børnini verða eggjað at kanna og gera roydnir úti í náttúruni.

Í øllum virkseminum hava tey vaksnu ein stóran leiklut at knýta orð og hugtøk til tað, sum børnini uppliva í náttúruni. Á tann hátt verður málsligi førningurin hjá børnunum stuðlaður í einum funktionellum samanhangi.

### *6.4 Tónleikur og rørsla*

Í ljósinum av at sangur, tónleikur og rørsla skapa gleði og rúmd í tí dagliga og styrkja innlæringarevni barnsins, eiga vit at leggja dent á:

- At sangur er ein natúrligur og sjálvsagdur partur av skúladegnum hjá Skúlaspíranum.
- At knýta sang og rørslu at fakligum innihaldi
- At arbeiða við sangspølum og dansispølum
- At arbeiða við røddini. Hvat er at syngja/tosa hart, spakuliga, nattúrliga?
- At arbeiða við ljóðum. Hvat er veikt, miðal, hart, ógvusligt?
- At arbeiða við rútmum

Dentur eigur at vera lagdur á at syngja ymisk sangsløg.

Barnasangir, sangir, sum eru knýttir at árstíðunum og høgtíðunum, rímur og skjaldur og at luttaka í morgunsanginum í skúlanum.

### *6.5 Kropslig menning*

Næmingarnir fáa møguleika at menna grovmotorikk og sansirnar, tí grovmitorikkur og góð sansastimbran eru týðandi fortreytir fyri læring. Skipast má so fyri, at umhvørvið, har børnini halda til, hevur hesar møguleikar.

Børnini fáa møgleika at røra seg hvønn dag og at uppliva, at rørsla skapar vælveru.

Børnini læra at hava tamarhald á egnum rørslum við at m.a. at rulla, grulva, hoppa, hanga, klúgva, sparka, kasta, taka ímóti og skumpa. Øll børnini fáa sansistimbrandi venjingar við tí fyri eyga at menna javnvágsevnini, tí hesar gagna øllum børnum.

Svimjing er partur av kropsligu menningi, soleiðis at tey verða trygg við at vera í vatni og at duga at lata seg í og úr.

Børnini læra at bera seg at í spæli – menna sosialu førleikarnar.

### *6.6 Handaverk og list*

Menna næmingarnar ígjøgnum inntrykk at útrykkja seg kropsliga/handaliga.

- tekna
- klippa og líma
- mála
- smíða, skrúða og telgja
- arbeiða við ymiskum tilfari
- arbeiða við tilfeinginum í nærumhvørvinum
- taka útgangsstøði í egnu upplivingum við drama, tónleiki og frásagnum
- vitja mentunarlig støð

Hetta mennir og økir um barnsins:

- forvitni
- hugflog
- skapanarevni
- fínmotorik
- sansir

# 7.0 Amboð, arbeiðshættir og eftirmetingar

### *7.1 Amboð at nýta innan ymisku námsætlanirnar*

| | |
|---|---|
| **Mál og málberingarhættir** | Bøkur, bókasavn, málspøl, samrøðuhættir, tilfar til skriviverkstaðir, talva, lærutilfar á veggi |
| **Talfatan** | Skygni til 0. flokk, ymiskt praktiskt roknivirksemi, spøl, teldan |
| **Tónleikur/rørsla** | Sangir, dansispøl, rútmuljóðføri, fløgur |
| **Kropslig menning** | Náttúran, skúlagarður, fimleikarahøllin, svimjihøllin |
| **Handaverk og list** | Tilfeingi úr náttúruni, annað tilfar, søvn og listafólk í nærumhvørvinum, teldan, tónleikur, dansur |
| **Náttúran** | Túrar, tilfeingi úr náttúruni, sjóneyka, kikari, glúpar, røtt útiklæði o.s.fr. |

Skipast má so fyri, at møguleiki er fyri ymiskum krókum/rúmum við ymiskum virksemi, so sum dukkukróki, legokróki, kreativitetskróki. Uttanumøkið eigur at vera avbjóðandi við tilhoyrandi virksemi, soleiðis at umstøður eru fyri tí fría og skipaða spælinum hvønn dag bæði inni og úti.

Harafturat skal eisini verða møguleiki fyri vanligari floksundirvísing við talvu, pulti, borðum, stólum og øðrum.

### *7.2 Arbeiðshættir*

1) Týdningarmikið er at seta greið mál fyri hvørt lærugreinaøkið
2) Seta mál fyri, hvar einstaki næmingurin eigur at vera náddur, áðrenn formella undirvísingin byrjar í 1. flokki
3) Nakrar ferðir um árið eigur at vera arbeitt í evnum, møguliga eisini saman við næmingunum í 1. flokki.
4) Starvsfólkið hevur greiðar avtalur um, hvør tekur sær av hvørjum. Tann, sum hevur ábyrgd av tilrættisløgdum konkretum virksemi - hevur fokus har, meðan hin starvsfelagin hjálpir børnunum at vera við í virkseminum.
5) Starvsfólkini hava felags mál fyri, hvat tað er at vera skúlabúgvin. Tey leggja arbeiðið soleiðis tilrættis, at allir førleikar barnsins verða mentir í virksemi Skúlaspírans.

### *7.3 Mál- og eftirmetingaramboð*

Áðrenn barnið kemur í Skúlaspíran eigur at hava verið mett um:

- Málsliga førleikan
- Sosiala førleikan
- Kropsliga førleikan

Á henda hátt verður lættari hjá teimum, sum eru um børnini í Skúlaspíranum, at tryggja hvørjum einstakum barni eitt mennandi og læruríkt ár.

Henda meting skal gerast í barnagarðinum - í samráð við NSR-tænastuna og eigur at vera leiðslu skúlans í hendi, áðrenn barnið byrjar í Skúlaspíranum við loyvi frá foreldramyndugleikanum.

Í Skúlaspíranum verða sett týðulig og ítøkilig mál fyri hvørt einstakt barn, og gjørdar verða eftirmetingar/eygleiðingar og samrøður við einstaka barnið. Mál verða eisini sett fyri allan flokkin. Foreldur verða kunnað um hvørji mál eru sett til barn teirra og til flokkin. Meting av førleikum hjá einstaka barninum eigur at vera gjørd einaferð í skúlaárinum - og við ársenda. Hesar metingar tekur skúlin sær av í samráð við NSR-tænastuna. Metingin við ársenda eigur at vera nágreinilig og eigur at nýtast sum eitt hent amboð hjá læraranum, sum tekur ímóti barninum í 1. flokki.

### *7.4 Støðumet*

Endamálið er at finna støðið hjá barninum, soleiðis at barnið kann mennast á besta hátt á tí støði, tað er á.

1. Í fyrru helvt av septembur verður meting gjørd um málsliga støðið, talfatan og støðulýsing av kropsligum førleika.

2. Í seinnu helvt av septembur er foreldraviðtala um einstaka barnið.

3. Í januar verður kanning/meting gjørd av:

- málsligum førleika
- talfatan
- støðulýsing av kropsligum førleika
- møguligur NSR tørvur

4. Í februar er foreldraviðtala um einstaka barnið

5. Síðst í mai verður nágreinilig meting gjørd um einstaka barnið. Metingin skal nýtast sum amboð hjá lærarарnum, sum tekur ímóti barninum í 1. flokki. Eisini verður støða tikin til, um barnið er ført fyri at fara í 1. flokk. Um barnið ikki er búgvið at fara í 1. flokk, heldur tað áfram í Skúlaspíranum eitt ár afturat við foreldranna samtykki.

## 8.0 Kunning

Tað er av stórum týdningi, at kunning um úrslitið hjá arbeiðsbólkinum fer fram á so skynsaman hátt sum til ber, soleiðis at øll kunnu kenna seg trygg við Skúlaspíran.

- tilmælið eigur at verða lagt á heimasíðuna hjá kommununi
- tilmælið eigur at vera góðkent av Eysturkommunu, áðrenn tað verður lagt út á heimasíðuna

Kunning fyri foreldur og starvsfólk verður fyriskipað aftaná, at tilmælið er góðkent av Eysturkommunu.

# Barna- og skúlaøki

# í

# Eysturkommunu

29. apríl 2010

## Innihald

Samandráttur ... 43
1.0 Grundarlag ... 45
1.1 Verkætlanarfyriskipan ... 45
1.2 Endamál og arbeiðssetningur ... 46
1.3 Arbeiðs- og tíðarætlan ... 46
1.4 Arbeiðsháttur ... 46
2.0 Byrjan ... 47
2.1 Verkætlanarbyrjan og væntanir ... 47
2.2 Teambuilding ... 47
3.0 Verandi støða og møguleikar ... 47
3.1 SWOT-greining ... 47
3.2 Visión í mun til arbeiðssetning ... 49
4.0 Býtið og fysiskir karmar ... 49
4.1 Skúlaspírin ... 49
4.2 1. og 2. flokkur ... 50
4.3 Íløgur ... 51
5.0 Samstarv ... 51
5.1 Hvat skal til fyri at fremja eitt gott samstarv? ... 51
5.2 Hvussu skal samstarvið millum stovnarnar skipast? ... 52
6.0 Leiðsla og samstarv ... 53
6.1 Hvussu skipar man leiðsluna á skilabesta hátt? ... 54
6.2 Ber til at skipa eina felags ráðlegging? ... 55
6.3 Hvussu skulu praktisku viðurskiftini skipast? ... 55
6.4 Hvussu skapa vit felags fatan innan økið (terminologi)? ... 56
7.0 Børn/næmingar við serligum, øðrvísi og vanligum tørvi ... 56
7.1 Hvussu tryggja vit, at øll børn fáa bestu karmar at virka undir? ... 56
7.2 Hvussu samstarva vit í mun til tagnarskyldu, fráboðanarskyldu og fyrisitingarlóg ... 57
7.3 Hvussu tryggja vit at einstaka barnið/næmingurin fær sum mest burturúr ... 59
7.4 Ber til at gera eina ætlan fyri barnið/næmingin, sum fylgir barninum/næminginum? ... 59
7.5 Hvussu samstarva vit tvørfakligt t.d. við NSR og barnaverndartænastuna? ... 61
7.6 Er tørvur á fleiri fakligum amboðum? ... 62
8.0 Førleikamenning ... 63
9.0 Kunning ... 63

**Samandráttur**

Tá eitt leiðslutoymi, har allar leiðslur innan barna- og skúlaøkið luttaka á jøvnum føti, er skipað, gevur hetta góðar møguleikar fyri menning á økinum. M.a. ber til at gagnnýta fakligu førleikarnar hjá hvørjum øðrum á ein øðrvísi hátt enn gjørt verður í dag, umframt at hetta eisini skapar fortreytir fyri felags ráðlegging og øðrum felags átøkum. Leiðslutoymið skapar synergi effektir og letur upp fyri heilt nýggjum menningarmøguleikum í framtíðini.

Leiðslusamstarvið skapar gróðrarbotn fyri einum tøttum samstarvi millum starvsfólkini í barna- og skúlaøkinum, sum er ein avgerðandi fortreyt fyri, at barnið fær eina góða flyting millum stovnarnar.

Øll tilboð verða sum mest skipað sum heildartilboð, og ein menningarætlan verður gjørd fyri øll børn, sum fylgir børnunum, tá tey flyta stovn. Øll børn skulu hava bestu karmar at virka undir, uttan mun til hvønn tørv tey hava. Í hesum sambandi ber eisini til at skipa samstarv við aðrar tænastur t.d. NSR, SSP o.o.

Arbeiðsbólkurin metir harumframt, at við at Skúlaspírin verður verandi í skúlanum eftir loknan skúladag, verða skaptir góðir karmar fyri børnini at byrja teirra lívsleið innan læring, sum í dag fevnir um alt lívið.

Arbeiðsbólkurin takkar fyri álitið og vónar at tikið verður væl ímóti tilmælinum fyri barna- og skúlaøkið. Vit eru ikki í iva um, at hetta er eitt stig á rættari leið til eina betri samskipan innan barna- og skúlaøkið í Eysturkommunu.

Leiðslutoymið (skipað samstarv og samskipan millum allar stovnar)



Arbeiðsbólkurin fyri barna- og skúlaøki

Kommunuskrivstovan í Eysturkommunu, tann 29. apríl 2010

Hallbjørg Eliassen

Sigvør Gergersen

Ingi Hansen

Fríðfinnur Johnsson

Elin Mikkelsen

**Heidi I Tvørfoss**

## 1.0 Grundarlag

Á býráðsfundi 9. novembur 2009 samtykti Eysturkommuna einmælt tilmælið frá verkætlanarbólkinum, ið mælir til at seta ein arbeiðsbólk at kanna, um tað er skilagott at skipa eitt tættari samstarv millum skúlan, frítíðarheimini, barnagarðarnar og dagrøktina.

### *1.1 Verkætlanarfyriskipan*

Fyri at skapa bestu fortreytir fyri arbeiðnum, verður settur ein arbeiðsbólkur, ið skal koma við tilmæli um, hvussu samstarvið millum skúla, frítíðarheim, barnagarð og dagrøkt skal skipast soleiðis, at børnini og næmingarnir koma at trívast og mennast enn betri.

Í arbeiðsbólkin eru vald fólk, sum hava førleika og ábyrgd innan barna- og skúlaøkið. Í arbeiðsbólkinum eru leiðararnir á skúlunum, ein leiðari, sum umboðar barnagarðarnar, ein leiðari, sum umboðar frítíðarheimini, leiðarin fyri dagrøktini og trivnaðarleiðarin í Eysturkommunu.

Eitt umboð fyri verkætlanarbólkin skipar fundirnar hjá arbeiðisbólkinum og stýrir arbeiðnum á ein slíkan hátt at endamálið verður nátt. Arbeiðisbólkurin finnur loysnir í mun til arbeiðsetningin og er ein av trimum arbeiðsbólkum, sum eru settir í sambandi við broytingarnar í skúlabygnaðinum í Eysturkommunu.

ólkur:
millum
heim og
arð

### *1.2 Endamál og arbeiðssetningur*

**Endamál:**
Endamálið er, at børnini og næmingarnir koma at trívast og mennast enn betri

**Arbeiðssetningur:**
Arbeiðssetningurin er hesin: Hvussu skal samstarvið millum skúla, frítíðarheim, barnagarð og dagrøkt skipast soleiðis, at endamálið kann røkkast?

**Undirpunkt til arbeiðssetningin:**

- ✓ Hvussu skulu børnini frá Skúlaspíranum til 3. flokk í Eysturkommunu verða ansað?
- ✓ Hvussu skal býtið verða, tvs. hvør skal verða saman og hvar?
- ✓ Hvat skal til fyri at fremja gott samstarv?
- ✓ Hvussu skal samstarvið millum stovnarnar skipast?
- ✓ Hvussu skipar man leiðsluna á skilabesta hátt?
- ✓ Ber til at skipa eina felags ráðlegging? (planlegging)
- ✓ Hvussu skulu praktisku viðurskiftini skipast?
- ✓ Hvussu skapa vit felags fatan innan økið (terminologi)
- ✓ Hvussu tryggja vit, at øll børn fáa bestu karmar at virka undir? (serligan tørv, øðrvísi tørv og vanligan tørv)
- ✓ Á hvønn hátt skulu starvsfólkini førleikamennast, soleiðis at samstarvið verður sterkt og uppbyggjandi?

### *1.3 Arbeiðs- og tíðarætlan*

Verkætlanarbólkurin setti eisini upp eina arbeiðs- og tíðarætlan fyri arbeiðið. Arbeiðið byrjaði 8. Februar 2010 og varð liðugt 29. apríl 2010.

Í tíðarskeiðnum hevur arbeiðsbólkurin havt 9 fundir/arbeiðsdagar, íroknað byrjan og framløgu.

### *1.4 Arbeiðsháttur*

Í sambandi við einstøku punktini í arbeiðssetninginum hevur arbeiðsbólkurin verið býttur í 2 bólkar, sum hvør sær hava arbeitt við uppskotum til loysnir. Úrslitini, sum einstaki bólkurin er komin fram til, eru síðani løgd fram fyri hinum bólkinum. Á tann hátt eru endaligu loysnirnar viðgjørdar við støði í sjónarhorninum hjá øllum limum í arbeiðsbólkinum.

# 2.0 Byrjan

### *2.1 Verkætlanarbyrjan og væntanir*

Fyrsti fundurin í arbeiðsbólkinum var tann 8. februar 2010. Á hesum fundi varð grundarlagið fyri arbeiðnum gjøgnumgingið og viðgjørt. Harumframt vóru væntanirnar settar upp og viðgjørdar fyri at tryggja, at øll høvdu somu fatan av uppgávuni.

### *2.2 Teambuilding*

Bólkurin setti 17. februar 2010 av til at arbeiða við teambuilding, hetta fyri at samansjóða bólkin og fyri at fáa nakað av íblástri til, hvussu ein tílíkur bólkur arbeiðir. Fyrst varð arbeitt við, hví tað er skilagott at arbeiða í einum bólki á henda hátt, og síðani varð arbeitt við styrkjum, veikleikum, møguleikum og hóttanum hjá bólkinum. At enda varð arbeitt við spælireglum fyri bólkin og úrslitið er eitt undirskrivað skjal við hesum spælireglum:

- ✓ Vit hava virðing fyri menningini hjá hvørjum øðrum
- ✓ Vit arbeiða miðvíst fram móti málinum við at finna loysnir
- ✓ Vit eru opin og erlig um okkara sjónarmið/frustratiónir
- ✓ Vit møta til tíðina og eru vælfyrireikað
- ✓ Vit hjálpa hvørjum øðrum
- ✓ Vit lurta eftir hvørjum øðrum
- ✓ Vit hava ein lættan umgangstóna, gaman og álvara
- ✓ Vit hava góðar kaffisteðgir, hugnaligt
- ✓ Vit fara heim við eini góðari kenslu

# 3.0 Verandi støða og møguleikar

### *3.1 SWOT-greining*

Fyri at skapa bestu fortreytir at arbeiða útfrá, hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina SWOT-greining í mun til toymið og eina SWOT-greining í mun til barna- og skúlaøkið. SWOT-greiningarnar lýsa hvørjar styrkir, veikleikar, møguleikar og hóttanir eru í samstarvinum innan barna- og skúlaøkið í Eysturkommunu.

Eysturkommuna

# SWOT-greining fyri toymi

## Strength (Styrkir)

- Vit vilja samstarv
- Ymiskir fakbólkar við áhuga í sama øki
- Bæði kyn eru umboðað í toyminum
- Allir bólkar eru umboðaðir
- Øll eru áhugað í at fáa eitt gott úrslit
- Øll hava royndir og tankar um setningin

## Weakness (Veikleikar)

- Kenna ikki hugsanir hjá hvørjum øðrum
- Vit hava verið ov langt frá hvørjum øðrum
- Vit vilja bert, hvat vit hava nú
- Toymið er ikki fulmannað
- At øll ikki eru møtt til allar fundirnar
- Tíðarfreistin er stutt
- Karmarnir økonomiskt og fysiskt eru ikki loystir

## Opportunities (Møguleikar)

- Vit kunnu læra at kenna hvønn annan og læra av hvørjum øðrum
- Vit kunnu byrja at samstarva á økinum
- Vit fáa møguleikar at skapa nýhugsan og menning á barna- og skúlaøkinum
- Samstarv millum tey ymsu økini
- Skapa betri trivna hjá okkum leiðarum og harvið eisini hjá børnum og starvsfólkum
- Betri forstáilsi fyri økinum

## Threat (Hóttanir)

- Fakfeløg og aðrir instansir
- Fordómar uttanífrá
- Man kann koma í iva um rætt verður atborið
- Innanhýsis ósemjur kunnu hótta málið
- Ávirkan uttanífrá kann hótta toymið
- Ótryggleki um økið

savnandi opin og vinarlig framsøkin

www.eysturkommuna.fo

Eysturkommuna

# SWOT-greining fyri barna- og skúlaøki

## Strength (Styrkir)

- Væl útbúgving fólk/karmar
- Visionera kommunu vilja framburð
- Ætlaninin er gjørd – álitið liggur frammi
- Kommunan hevur sett pengar, tíð og fakfólk at loysa málið
- Styrkir samleikan hjá íbúgvunum beinan vegin
- Fíggjarliga orkan hjá kommununi at gera broytngar

## Weakness (Veikleikar)

- Manglandi kunning (foreldur/onnur)
- Fysisku karmarnir ikki púra greiðir
- Spurningurin um starvsfólkabýti/børn ikki greitt nokk
- Ikki nóg greið útmelding frá kommununi
- At karmarnir ikki eru heilt greiðir
- Fakbólkarnir ikki eru vanir at samstarva

## Opportunities (Møguleikar)

- Kunning – skapar tryggleika
- Nú hava vit møguleikan til at fara í gongd og skapa røttu fyrisku karmarnar
- Visiónin (framsøkin) gerst veruleiki
- At kommunan hevur førleikar, økonomiskt og tekniskt, at gjøgnumføra broytingar
- Breiðari starvsfólkahópur
- Sparingar, hækka tænastustøðið, betri tænastur, spesialiseringar

## Threat (Hóttanir)

- Fólk vilja ikki broytingar
- Negativir holdningar viðv. broytingum
- Um fysisku karmarnir ikki eru í lagi
- Tey, sum eru ímóti, kunnu seinka gongdini - steðga
- At fíggjarviðurskiftini kunnu broytast - steðga gongdini
- Ótti fyri broytingum – tað lokala

savnandi opin og vinarlig framsøkin

www.eysturkommuna.fo

### *3.2 Visión í mun til arbeiðssetning*

Bólkurin hevur sett upp eina visión í mun til arbeiðssetningin frá verkætlanarbólkinum. Visiónin lýsir úrslitið í mun til arbeiðssetningin, tvs. ynskiligu støðuna í framtíðini.

Visiónin er skrivað í nútíð og gevur arbeiðsbólkinum eina leiðstjørnu, sum skapar fokus í mun til arbeiðið viðvíkjandi barna- og skúlaøkinum.

**Visión:**

**Við viðurkennandi samskifti og greiðum málum skapa vit menning og trivnað**

## 4.0 Býtið og fysiskir karmar

Í sambandi við at øll børn í Eysturkommunu frá Skúlaspíranum til 3. flokk skulu ganga í skúla í Leirvík, standa hesir spurningar ósvaraðir:

1. Hvussu skulu børnini frá Skúlaspíranum til 3. flokk í Eysturkommunu verða ansað?
2. Hvussu skal býtið verða, og hvør skal verða saman og hvar?

Arbeiðsbólkurin mælir til at:

- ✓ Skúlaskpírin verður verandi í skúlanum eftir loknan skúladag og at
- ✓ 1.og 2. flokkur vera á Gásamýri/gl. kommunuskrivstovuni

### *4.1 Skúlaspírin*

Grundgevingar fyri at Skúlaspírin verður verandi í skúlanum eftir loknan skúladag:

- ✓ Børnini hava bert eitt stað at fyrihalda seg til
- ✓ flokkurin er nóg stórur bólkur til, at tey fáa mótspæl frá hvørjum øðrum
- ✓ Skúlatilboðið og frítíðartilboðið verður meira líkt einum heildagstilboðið.
- ✓ Karmarnir eru góðir, og undir skipaðum viðurskiftum eru møguleikar fyri at gagnnýta aðrar hentleikar í skúlanum – fimleikarhøll/ svimjihøll/ ítrivsrúm o.a.
- ✓ Samskiftið millum yrkisbólkar verður tættari, og tískil skapast góðir karmar fyri trivnaði og menning.

Tað er gott fyri Skúlaspíran at vera fyri seg sjálvi. Hetta gevur tryggleika fyri tey, tá tað kann vera torført hjá teimum at rúma at vera saman við alt ov stórum bólki allan dagin, tey vilja jú vera tey yngstu allan dagin og skulu tí liva upp til alt ov nógv.

Áðrenn farið verður í Skúlaspíran, ganga børnini í Gøtu í Gjáa og børnini í Leirvík ganga í Brúsa. Hetta eru børn, sum eru ókend fyri hvørjum øðrum. Tey koma frá tryggum og kendum umhvørvi. Tey hava gingið á einari stovu saman við á leið átjan børnum. Frá at hava gingið í barnagarði og til at fara í Skúlaspíran sum seks ára gamal, fer at krevja nakað annað av barninum. Onnur krøv verða sett til barnið og nógv "nýtt" (normar og reglar) er hjá barninum at fyrihalda seg til. Við hesum í huga kann vera skilagott, at hesin bókurin ikki er ov stórur eftir lokna skúlatíð hetta árið.

Visiónin fyri Skúlaspíran er: við leiki og læru er næmingurin búgvin til skúlan. T.v.s., at eitt stórt arbeiði liggur fyri framman hetta árið fyri at gera barnið skúlabúgvið. Ikki bert í "skúlatíðini", men eisini í fylgjandi frítíðartilboði, soleiðis at ein reyður tráður fylgir degnum hjá barninum. Fyri at kunna fylgja einstaka barninum upp er betri, at hesin aldursbólkurin verður fyri seg. Hetta fyri at hond kann verða tikið um einstaka barnið, soleiðis at onki barn gleppur burturímillum. Um so er, at mett verður, at barnið ikki skal fara í 1. flokk, men heldur bíða eitt ár, so er møguleiki fyri, at barnið heldur áfram í Skúlaspíranum. Um Skúlaspírin og 1. fl. skuldu verið saman, verður bólkurin ov stórur og verri er at fáa eyga á, um einstakt barn hevur brúk fyri eyka stimbran.

**Týdningarmikið er tó at teir fysisku karmarnir eru ílagi, eru tillagaðir børnunum og innrættaðir til endamálið. Umframt at tilboðið verður væl skipað, áðrenn tað verður byrjað. Av týdningi er, at tað er gott samskifti millum leiðaran á frítíðartilboðnum og skúlanum.**

### *4.2 1. og 2. flokkur*

Grundgevingar fyri at 1. og 2. flokkur vera á Gásamýri/gl. kommunuskrivstovuni:
Børnini kunnu býtast í hóskandi bólkar, tí har eru nógv ymisk høli og tey eru passandi í stødd til 1.og 2. flokk. Útiøkið kann eisini býtast upp, um tað verður hildið at vera best.

Tað, at børnini kunnu vera saman, ella býtast í hóskandi smærri bólkar, er við til at skapa enn betri umstøður fyri sosialari menning. Aldursbólkurin er góður at arbeiða við – tey geva hvørjum øðrum mótspæl.

Til ber hjá børnunum at ganga millum skúlan og frítíðaransingina, eingin koyring er neyðug um dagin. Børnini koma um morgunin og fara av stað aftur, tá ið dagurin er liðugur. Góðir møguleikar eru at koma út í náttúruna, Limmulundina, hagan og fjøruna umframt at økið rundanum skúlan á Gásamýri og gl. kommunuskrivstovuna eru sera væl egnað til aldursbólkin.

Tað skulu ikki gerast stórar íløgur fyri at skapa eitt spennandi og mennandi umhvørvi. Stovnurin liggur stutt frá skúlanum, og møguleiki er fyri at gagnnýta hentleikarnar í skúlanum. Stovnurin er góður at koma til og frá, parkeringsviðurskiftini eru góð. Harumframt er umráðandi, at børnini javnan gera útferðir til Gøtu (t.d. til Gøtu sand, Blásastovu, Sarpugerði o.a.), soleiðis at Gøta eisini verður nærumhvørvi fyri børnini í Eysturkommunu.

Til ber at gagnnýta starvsfólkini betur. Um mangul er í einum stað og ríkiligt er í einum øðrum stað, so kunnu starvsfólkini fara, har ið tørvur er.

### *4.3 Íløgur*

**Íløgur/ broytingar í sambandi við barna- og skúlaøkið!**

Mælt verður til, at um tað er neyðugt, so verður útbygt í hølunum á Gásamýri/gl. kommunuskrivstovuni, so pláss verður fyri børnunum. Dømi um útbygging eru, at loftið í serstovninum verður innrættað (møguliga til goymslu), at ein stova verður bygd millum Gásamýru og kommunuskrivstovuna, at ein skrá gongubreyt verður gjørd frá økinum á Gásamýru og upp til miðhæddina á gomlu kommunuskrivstovuni. At gjørd verður ein gongugøta frá skúlanum og beint inn á Garðsveg, gongubrúgv verður gjørd tvørtur um Brúsá, so næmingar og starvsfólk trygt kunnu ganga millum skúlan og frítíðarskúlan.

Uttanumøkið við Gásamýru skal eisini betrast við útileikum og øðrum umframt, at uttanumøkið við skúlan skal betrast munandi við fleiri útileikum o.a. Útiøkið kann eisini býtast upp, um tað verður hildið at vera best.

## 5.0 Samstarv

### *5.1 Hvat skal til fyri at fremja eitt gott samstarv?*

Tað er av stórum týdningi at tað verður eitt gott samstarv innan barna- og skúlaøkið sum heild. Tað eru fleiri viðurskifti, sum eru avgerðandi fyritreytir fyri einum góðum samstarvi og við hesum spurninginum:

**hvat skal til fyri at fremja eitt gott samstarv?**

hevur arbeiðsbólkurin sett upp fleiri fyritreytir:

- ✓ Vit virða hvønn annan og vísa álit fyri hvørjum øðrum sum menniskju og sum yrkisbólkar.
- ✓ Vit stuðla og stimbra hvønn annan.
- ✓ Vit taka felags ábyrgd.
- ✓ Vit fremja felags loysnir.
- ✓ Vit kunnu arbeiða tvørtur um mørk – sum yrkisbólkar. Hetta setir krøv til hvønn einstakan yrkisbólk og førir tað við sær trivnað og menning – eitt opið arbeiðsumhvørvi.
- ✓ Vit stimbra og skapa karmar fyri nýhugsan til frama fyri børn og ung.
- ✓ Vit gera felags námsætlanir - talan kann vera um, at fleiri yrkisbólkar í felag gera námsætlan fyri tað einstaka barnið.
- ✓ Vit seta mál og eftirmeta. Tað er ógvuliga umráðandi at øll mál verða eftirmett javnan.

- ✓ Kenna hvønn annan sum yrkisbólkar.
- ✓ Seta "realistisk" mál.
- ✓ Hvør yrkisbólkur setur orð á sínar førleikar.
- ✓ Felagsmál
- ✓ Felags barnaáskoðan – tvs. at kommunan arbeiðir við at orða ein "barna- og ungdómspolitikk". Kommunan inndregur vitan frá egnari arbeiðskraft – stovnsleiðarunum, skúlaleiðarum o.ø., ið dagliga arbeiða við ásettu aldursbólkum.
- ✓ Reyðan tráð í arbeiðnum.
- ✓ Leiðslutoymið – tætt samskifti ímillum stovnarnar.
- ✓ Opið arbeiðsumhvørvi (dømi at dagrøktarmamman saman við barninum vitjar komandi tilboð)

### *5.2 Hvussu skal samstarvið millum stovnarnar skipast?*

Harumframt hevur tað stóran týdning at samstarvið millum stovnarnar verður skipað og við hesum spurninginum:

**hvussu skal samstarvi millum stovnarnar skipast?**

er arbeiðsbólkurin samdur um, at skipast skal fyri einum tøttum samstarvi millum stovnarnar, soleiðis at barnið hevur eina góða flyting ímillum stovnarnar.




Greiðar reglur skulu vera fyri samstarvinum, so sum nær fundir vera, hvør kallar inn til fundar, hvar fundurin skal vera, og hvussu ofta fundir skulu vera. Eisini eigur at verða hugsað um etiskar reglur, tagnarskyldu o.a. í sambandi við hesar fundir. Tað skal standa í starvslýsingini/setanarskrivinum, at ein partur av arbeiðinum hjá leiðarunum í stovnunum í Eysturkommunu er at samstarva við hinar leiðararnar.

Leiðararnir seta sær greið mál fyri samstarvið og møtast javnan:

- ✓ Allir leiðararnir møtast tvær ferðir árliga.
- ✓ Leiðararnir í Leirvíkar skúla og leiðarin í frítíðarskúlanum møtast minst tvær ferðir árliga
- ✓ Leiðararnir í Brúsa, Gjáa og dagrøktini møtast eina/tvær ferðir árliga
- ✓ Leiðararnir í Brúsa, Gjáa, dagrøktini og frítíðarskúlanum møtast fýra ferðir árliga. Henda skipan er longu veruleiki.
- ✓ Skúlaleiðararnir í Gøtu skúla og Leirvíkar skúla møtast minst tvær ferðir árliga.
- ✓ Um tørvur er á tí, verður kallað inn til fund í einum leiðarabólki. Allir leiðarar kunnu gera tað.
- ✓ Allir fundir skulu hava skrá, sum verður send út til øll í góðari tíð. T.d. eina viku áðrenn fundin.
- ✓ Øll, sum skulu møta á fundinum, kunnu seta mál á skránna.

Tað eigur at verða skipa fyri felagstiltøkum fyri øll, sum arbeiða innan fyri økið børn og ung í Eysturkommunu. Tað eigur at verða minst eitt sosialt tiltak og eitt fakligt tiltak á hvørjum ári.

Skipað eigur at verða fyri trivnaðarkanningum, sum siga, hvussu tað gongur við samstarvinum. Tað vil siga, hvussu tað gongur at røkka teimum málum, sum vit hava sett okkum. Hesar kanningar skulu gerast bæði millum leiðararnar og millum foreldur, sum varða av børnunum í Eysturkommunu.

## 6.0 Leiðsla og samstarv

Í sambandi við broytingarnar í skúlabygnaðinum er tað eisini áhugavert at hyggja at, um tað møguliga er skilagott at skipa leiðsluna øðrvísi enn talan er um í dag sæð í mun til barna- og skúlaøkið sum heild. Harumframt er tað eisini áhugavert at hyggja at, um tað eru onnur viðurskifti, har samstarvið møguliga kann mennast, børnunum at gagni.

Arbeiðsbólkurin hevur í hesum sambandi arbeitt við hesum spurningum:

Hvussu skipar man leiðsluna á skilabesta hátt?

Ber til at skipa eina felags ráðlegging?

Hvusssu skulu praktisku viðurskiftini skipast?

Hvussu skapa vit felags fatan innan økið (terminologi)?

### *6.1 Hvussu skipar man leiðsluna á skilabesta hátt?*

Tað er sera umráðandi at allir leiðslustrukturar eru púra greiðir, og tískil mælir arbeiðsbólkurin til, at tað verður ein leiðari og ein deildarleiðari til frítíðarskúlan, sum fevnir um Skúlaspíran, 1. og 2. flokk.

Eisini verður mælt til at skúlastjórin í Leirvíkar skúla hevur fulla ábyrgd av skúlatilboðnum. Eftir loknan skúladag hevur leiðarin í frítíðarskúlanum ábyrgdina av at skapa eitt spennandi og mennandi tilboð til børnini. Skúlaspírin verður verandi í skúlanum eftir skúlatíð, og tískil verður mælt til, at leiðarin í frítíðarskúlanum vísir beinleiðis til skúlastjóran í Leirvíkar skúla, tá talan er um fysiskar karmar og praktisk viðurskifti í hesum sambandi.

Harumfarmt verður mælt til, at allir leiðarar innan barna og skúlaøkið samstarva í einum leiðslutoymi, har arbeitt verður miðvíst við at skapa eitt tætt samstarv millum ansingarøkið og skúlan.

Leiðslutoymið er ein eind av einstaklingum, sum við ymiskum sjónarmiðum arbeiða móti felags málum fyri økið sum heild, har endamálið er at loysa uppgávuna á fullgóðan hátt.

Arbeiðið í toyminum fevnir m.a. um hesi viðurskifti:

- Seta felagsmál
- Hava felags ábyrgd
- Koma til felags niðurstøður
- Brúka styrkirnar hjá hvørjum øðrum
- Hava felags áskoðan um, hvussu toymisarbeiðið skal skipast
- Hava eina felagsvisión
- O.a.

Tað er eisini av stórum týdningi at skúlastjórin í Leirvíkar skúla og leiðarin í frítíðarskúlanum skipa fyri tøttum samstarvi, soleiðis at karmarnir fyri Skúlaspíran verða skipaðir so skilagott, sum til ber. Á tann hátt kunnu børnini fáa ein samanhangandi dag, sum gevur teimum bestu fortreytir fyri einari góðari skúlabyrjan í 1. flokki.

### *6.2 Ber til at skipa eina felags ráðlegging?*

Við at skipa leiðslurnar sum eitt toymi, eru allar fortreytir skaptar fyri at skipa fyri felags ráðlegging og øðrum felags átøkum. Tá ið leiðararnir í teimum ymsu stovnunum møtast, so eigur ein partur av skránni at vera ráðlegging.

Tætta samstarvið millum skúlastjóran í Leirvíkar skúla og leiðaran í frítíðarskúlanum krevur m.a. at teir hava fundir, har teir t.d. ráðleggja hvussu felagstiltøk verða skipað gjøgnum árið. T.d. nær foreldrafundir skulu vera, hvussu gjørt verður í sambandi við renningardag, jólahald o.a., har ið neyðugt er við samstarvi.

### *6.3 Hvussu skulu praktisku viðurskiftini skipast?*

Arbeiðsbólkurin mælir til hesi viðurskifti:

Skipast má soleiðis fyri, at allir næmingar sleppa til øll tiltøk, sum eru til teirra aldursbólk. At flutningurin er tryggur, og at hugsað verður um at samskipa alt økið, so flutningurin ikki blívur ov nógvur, hvørki hjá næmingum ella starvsfólkum.

Bussamband til og frá skúla og frítíðarskúla skal vera allan dagin, tó mest seinnapartar. Møguliga skal eitt starvsfólk, sum er knýtt at Skúlaspíranum vera í morgunbussinum, so børnini ferðast trygt í skúla.

Er tørvur á flutningi til børn í dagrøkt, dagstovnum v.m., skal møguleiki vera fyri at seta seg í samband við avvarandi "bussfelag".

Møguleiki skal eisini verða hjá foreldrum ókeypis at fara úr Gøtu til Leirvíkar við bussinum eftir barni sínum. Møguleiki skal eisini vera fyri at koma aftur við sama bussi, tvs. at bussurin bíðar eina løtu í Leirvík (uml. 15 min).

Við tøttum samstarvi millum stovnar og skúla í toymisarbeiðnum og at gagnnýta teir fysisku karmarnar og førleikarnar hjá hvørjum øðrum, eru allir møguleikar opnir fyri ymiskum átøkum til frama fyri børn, foreldur og starvsfólk. Praktisku viðurskiftini verða avtalað og umrødd á toymisfundunum, sum verða avtalaðir og lagdir tilrættis á hvørjum árið.

Leiðararnir eiga at tosa saman, so alt, sum kann samskipast, verður samskipað Her verður bæði hugsað um foreldrafundir, felagsfundir, frídagar í skúlunum o.a. sum ávirkar øll, sum eru tengd at barna- og skúlaøkinum.

### *6.4 Hvussu skapa vit felags fatan innan økið (terminologi)?*

Vit eiga sum menniskju og yrkisbólkar at síggja ymiskleikan hjá hvørjum sær sum eina styrki og virða hvønn annan sum yrkisbólkar.

Vit kunnu skipa fyri felags skeiðum og gera felags menningarætlanir fyri barna- og skúlaøkið. Á tann hátt er møguligt við tíðini at skapa eina felags fatan og harvið eisini, at terminologiin við tíðini gerst felags.

Nevnast kann, at NSR arbeiðir við at skapa felags fatan av, hvat tað vil siga at hava serligan tørv. Tað gera teir við at skipa fyri skeiðum, har ið tað at hava serligan tørv verður umrøtt. Hesi skeið eru fyri leiðarar og fyri sertoymini. Sertoymini í skúlunum eru teir lærarar, sum mest taka sær av serundirvísingini.

Skipað eigur at verða fyri nøgdsemiskanningum/eftirmetingum bæði millum starvsfólk og millum foreldur, so vit fylgja við, hvussu starvsfólkini/foreldrini eru nøgd við tað arbeiðið, sum verður gjørt á barna- og skúlaøkinum sum heild, og verður hetta eisini við tíðini við til at skapa eina felags fatan innan økið.

## 7.0 Børn/næmingar við serligum, øðrvísi og vanligum tørvi

### *7.1 Hvussu tryggja vit, at øll børn fáa bestu karmar at virka undir?*

Arbeiðsbólkurin metir, at tað er av týdningi, at øll børn fáa bestu karmar av virka undir uttan mun til, hvønn tørv tey hava. Bólkurin hevur definerað, hvat hann skilir við ymisku tørvirnar, og hvat er umráðandi at hugsa um, í mun til ymisku tørvirnar.

Av týdningi er, at arbeitt verður fram ímóti, at øll tilboð eru heildartilboð, har ein menningarætlan verður gjørd fyri hvørt einstakt barn.

Tá børnini fara frá skúla til frítíðarskúla, er eisini av týdningi, at hetta er skipað og ein greið avtalað er um, hvussu børnini vera móttikin og avleverað. Her verður hugsað um, at námsfrøðingurin fer inn í skúlan, har hann heilsar uppá børnini og tosar við læraran um, hvussu dagurin hevur gingið.

**Serligur tørvur:**
*Okkara definitión uppá serligan tørv er:*
Barn, ið styttri ella longri tíðarskeið, er sálarliga ella likamliga illa fyri og barn, sum hevur stórar samskiftistrupulleikar. Talan kann verða um umsorganarsvík, happing, menningartarn, rørslutarn, talu- og hoyribrek, sjónveik o.a., sum kann viðføra, at barnið hevur tørv á, at persónur verður knýttur at barninum ella tilboðnum, við tí fyri eyga, at skapa mennandi karmar við atliti til tarnið.

Er talan um eitt fjølbrekað barn ella barn við sera álvarsligum trupulleikum – sálarliga ella likamliga, verður viðkomandi persónur knýttur at barninum.

Er talan um minni brek, ella at barnið er merkt av einum sálarligum ella likamligum tarni í styttri tíðarskeið, verður menningartilboðið "uppnormerað" við hóskandi tímatali. Tó skal viðmerkjast, at ein kontaktpersónur hevur ábyrgdina av øllum samskifti við foreldur, avvarðandi stovnar og myndugleikar.

**Øðrvísi tørv:**
*Okkara definitión uppá øðrvísi tørv er:*
Barn, ið styttri ella longri tíðarskeið hevur ein øðrvísi atburð, sum viðførir at stovnur/skúli hevur eitt vakið eyga við barninum. Talan kann verða um mildari stig av happing, umsorganarsvíki, menningartarni, rørslutarni, talu- og hoyribreki, sjónveik o.a.

Stovnur/skúli hevur ábyrgd av at vera um hendan málbólk og við verandi normering skapa mennandi umstøður. Stovnsins/skúlans skylda er at fyribyrgja, at trupulleikin versnar og at barnið ikki hevur "serligan tørv" fyri neyðini. Um so er, at barnið hevur so mikið "øðrvísi tørv" verður kannað nærri um onnur fyriskipan eigur at verða sett í verk.

**Vanligan tørv:**
Víst verður til dagstovna- fólkaskúlalógina.

### *7.2 Hvussu samstarva vit í mun til tagnarskyldu, fráboðanarskyldu og fyrisitingarlóg*

Arbeiðsbólkurin metir, at í samstarvinum millum stovnar er kunning millum stovnarnar neyðug. Hugsað eigur at vera um, hvat ið eigur at vera kunnað um, so fordómar o.a. negativt ikki verður yvirført millum stovnar. Bert tað, sum er viðkomandi, eigur at verða tikið við.

Tagnarskyldan kann í ein stóran mun vera ein forðing í menningini hjá barninum. Manglandi viðkomandi upplýsingar og væntandi kunning millum stovn, skúla, heilsusjúkrasystur, barnavernd, NSR o.o. kann viðføra, at barnið ikki mennist í nóg stóran mun.

Tagnarskyldan eigur ikki at verða brúkt sum ein umskylding fyri ikki at siga tað, sum er neyðugt at siga. Sambært § 14 í barnaverndarlógini hava vit fráboðanarskyldu:

**Fráboðanarskyldan**

§ 14. Starvsfólk innan almanna-, heilsu- og skúlaverk og onnur, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.

*Stk. 2.* Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari t.d. misrøkir, meinslar, misnýtir ella handfer barn soleiðis, at álvarsamur vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning, hevur skyldu at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.

Tí er okkara áskoðan, at foreldrini skriva undir uppá, at omanfyrinevndu myndugleikar hava møguleika at samskifta sínámillum til frama fyri barnið. Samskift verður bert um neyðugar upplýsingar, sambært §27 í fyrisitingarlógini.

**Fyrisitingarlógin § 27.**

Upplýsingar um heilt privat viðurskifti hjá einstaklingum, herundir upplýsingar um ættarslag, trúgv, og húðalit, um politisk, felagsskaplig, kynslig og revsiverd viðurskifti eins og upplýsingar um heilsuviðurskifti, stórar almannatrupulleikar og misnýtsla av njótingarevnum og líknandi, er ikki loyvt at lata øðrum fyrisitingarmyndugleika.

*Stk. 2.* Tær í stk. 1 nevndu upplýsingar kunnu tó latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika tá

1) hann, sum upplýsingin viðvíkur, hevur givið samtykki,
2) tað fylgir av lóg ella ásetingum við heimild í lóg, at upplýsingin skal latast víðari,
3) upplýsingin verður latin víðari fyri at røkja privat ella almenn áhugamál, sum greitt fara fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan, herundir umhugsni honum, sum upplýsingin viðvíkur, ella
4) tað er ein neyðugur liður í viðgerðini av málinum, at upplýsingin verður latin víðari, ella tað er neyðugt fyri at ein myndugleiki kann fremja eftirlits- ella umsjónaruppgávur.

*Stk. 3.* Aðrar trúnaðarupplýsingar kunnu umframt tey í stk. 2 nevndu føri bert latast víðari til annan fyrisitingarmyndugleika, tá tað má metast, at upplýsingin er av stórum týdningi fyri virksemið hjá myndugleikanum ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka.

*Stk. 4.* Samtykki sambært stk. 2, nr. 1, skal vera latið skrivliga og hava upplýsing um, hvat slag av upplýsingum og til hvat endamál, upplýsingar kunnu latast víðari. Vikið kann tó verða frá kravinum um, at upplýsingin skal vera skrivlig, um málið er soleiðis háttað ella umstøðurnar annars tala fyri tí.

Fráboðanarskyldan er eitt týðandi amboð, sum er til fyri at hjálpa hóttum børnum. Tí er neyðugt, at øll, sum eru um barnið, samskifta um støðuna hjá barninum, so øll børn, sum ikki hava tað nóg gott, eru fyri umsorganarsviki, ágangi ella øðrum hóttanum, fáa tað hjálp og vegleiðing, sum tey hava brúk fyri.

Fyrisitingarlógin skal haldast, men tørvurin hjá tí einstaka barninum má altíð havast í huga, so fyristingarlógin ikki er ein forðing fyri, at hótt børn fáa ta hjálp, sum tey hava tørv á.

### *7.3 Hvussu tryggja vit at einstaka barnið/næmingurin fær sum mest burturúr*

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at leiðslutoymið gevur munandi betri samskifti, og at hetta tryggjar at einstaka barnið/næmingurin fær sum mest burturúr. Børn hava ymiskan tørv og tí meta vit, at hvørt skifti verður tikið upp á toymisfundi og síðani viðgjørt í einstøkum førum – tað vil verða til gagn fyri barnið, at toymið miðjar eftir at taka støði í tí einstaka barninum. Somuleiðis eru allar fortreytir fyri at onki brot verður í visiónini um, at ein heildarætlan verður gjørd fyri tað einstaka barnið.

Á hesum toymisfundum verða tikin upp øll mál viðvíkjandi tørvinum/menningini hjá tí einstaka barninum. Hvør stovnur eigur at hava skrivligar mannagongdir, sum lýsa mannagongdina, tá ið børnini koma í stovnin og tá tey fara úr aftur stovninum.

### *7.4 Ber til at gera eina ætlan fyri barnið/næmingin, sum fylgir barninum/næminginum?*



Við góðum toymisarbeiði eru allir møguleikar fyri at samskipa eina heildarætlan fyri tað einstaka barnið og fyri barnabólkin (hvønn einstakan árgang). Talan er um øll børn í kommunalum tilboði, øll skúlabørn í Eysturkommunu og annars onnur børn undir 18 ár (0 – 18 ár).

Arbeiðsbólkurin metir, at fyri at geva eitt gott heildartilboð til barnið/næmingin, er av týdningi, at ein ætlan er gjørd fyri tað einstaka barnið/næmingin. Allir stovnar/skúlar gera á hvørjum ári minst eina skrivliga meting av øllum børnum/næmingum. Eitt skema, sum kann brúkast av øllum verður gjørt. Tá ið barnið fer í annan stovn/skúla fylgir metingin við. Stovnarnir/skúlarnir greiða foreldrunum frá hesum, so foreldur vita av tí og góðtaka tað. Bert í teimum førum, har foreldur mótmæla hesum, fylgir metingin ikki við.

Arbeiðið verður tilrættislagt eftir endamálsorðingunum í galdandi lógávum – her verður serliga hugsað um dagstovnalógina § 2, fólkaskúlalógina § 1, 2 og 3, fyrisitingarlógina og barnaverndarlógina §1, 2 og 3.

**Dagstovnalógin § 2.**

> Endamálið við námsfrøðiliga arbeiðinum á dagstovninum og dagrøktini er: við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling, at menna barnanna andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði, at búgva børnini til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldu í einum fólkaræðisligum samfelag, at menna tey skapandi evnini hjá børnunum við atliti til at styrkja teirra samleika, sjálvsvirði, sjálvskenslu og evni til at taka sær av egnum viðurskiftum á ein friðarligan og samstarvandi hátt, at tryggja børnunum eitt heilsugott og rørsluliga stimbrandi umhvørvi innandura og við uttanumøki, sum hóskar til barnsins aldur og førleika, í samstarvi við heimini at styrkja um barnsins fjølbroyttu menning í tøttum samspæli við náttúruna.
>
> *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin veitir kommununum ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum.

**Fólkaskúlalógin §1, 2 og 3**

> **§ 1.** [1)] Fólkaskúlin er tann almenni skúlin, sum býður undirvísing eftir hesi lóg.
>
> **§ 2.** Uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.
>
> *Stk. 2.* Fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúphugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.

*Stk. 3.* Fólkaskúlin skal í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling. Hann skal við støði í heimligari mentan menna kunnleika næminganna um føroyska mentan og hjálpa teimum at fata aðrar mentanir og samspæl manna við náttúruna. Hann skal búgva næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

**§ 3** Innan fyri settar karmar hevur tann einstaki skúlin ábyrgdina av undirvísingardygdini sambært endamáli fólkaskúlans, smb. § 2, og innan fyri hesar karmar ger skúlin av, hvussu hann skipar og leggur sína undirvísing til rættis.

*Stk. 2.* Skúlin samstarvar við næmingar og foreldur um at megna tað, sum er ásett í endamálsgrein fólkaskúlans.

**Barnaverndarlógin:**

**§ 1.** Endamálið við hesi lóg er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur.
*Stk. 2.* Myndugleikarnir skulu leggja dent á at finna loysnir, sum eru best fyri barnið.

**§ 2.** Lógin fevnir um børn í aldrinum frá 0 til fylta 18. árið.
*Stk. 2.* Í serligum førum kunnu fyriskipanir, ið eru settar í verk, innan barnið hevur fylt 18 ár, halda áfram, til viðkomandi fyllir 21 ár, um viðkomandi samtykkir. Um fyriskipanin ikki rínur við viðkomandi, og tað tí ikki tænir nøkrum endamáli, at viðkomandi er fevndur av hesi lóg, kann fyriskipanin ikki halda áfram.
*Stk. 3.* Somuleiðis fevnir lógin í teimum í § 14 nevndu førum um ófødda barnið.

**§ 3.** Lógin er galdandi fyri børn, ið eru stødd í Føroyum.

### *7.5 Hvussu samstarva vit tvørfakligt t.d. við NSR og barnaverndartænastuna?*

Arbeiðsbólkurin metir, at um hugsað verður um tað best møguliga tilboðið fyri tað einstaka barnið, er tað neyðugt við einum góðum samstarvi við tænastum, sum eru til gagn fyri tað einstaka barnið og eiga vit at gera brúk av hesum. Her verður serliga hugsað um NSR, Barnaverndartænastuna og SSP.

Á fundum, sum eru millum leiðarar á barna og skúlaøkinum verður avtalað, hvussu tað tvørfakliga samstarvið skal skipast. Hvør skal vera við til NSR-fundir og aðrar fundir, sum eru um børn, sum eru á tveimum stovnum samstundis, t.d. bæði í skúla og frítíðarskúla.

**NSR:**
Endamálið er at veita eina tænastu til børn við serligum tørvi og familjum teirra úti í teimum ávísu økjunum. Hetta verður gjørt við

- ✓ at samskipa tiltøk til børn við serligum tørvi í økjunum
- ✓ at skráseta tilmeldingar, skipa fyri og gera kanningar
- ✓ at umsita tímarnar vegna serligan tørv í økinum
- ✓ samskipa samstarvið millum kommunalu, almanna-, heilsu- og skúlamyndugleikarnar á staðnum
- ✓ at gera eina undirvísingar- og heildarætlan fyri barnið
- ✓ at ráðgeva foreldrum, stovnum, skúlum o.ø.

**Barnaverndartænastan:**
Endamálið við hesi lóg er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur. Lógin fevnir um børn í aldrinum frá 0 til fylta 18. árið.

**SSP:**
SSP er tvørfaklig samstarvsskipan millum fakbólkar, ið arbeiða ella hava samband við børn og ung. Endamálið er at savna og samskipa tað fyribyrgjandi arbeiðið og fremja felags atgerðir. SSP skal arbeiða fyri at fyribyrgja kriminaliteti og skaðandi atburði millum børn og ung.

### *7.6 Er tørvur á fleiri fakligum amboðum?*

Bólkurin metir, at við samstarvi við omanfyri nevndu tænastuveitingum, eru møguleikar fyri at fáa fleiri faklig amboð at arbeiða við. Vit vilja somuleiðis vísa á, at við einum toymisarbeiði eru møguleikar fyri at gagnnýta fakligu førleikarnar hjá hvørjum øðrum.

Umráðandi er, at eygleiðingarførleikarnir hjá starvsfólkunum verða mentir. Her verður hugsað um t.d., hvussu vit eygleiða samband millum foreldur og barn, tá ið foreldur koma við barni ella koma eftir barni. Hvussu eygleiða vit sosialar, málsligar, rørsluligar o.a. førleikar hjá børnum.

Eftirmetingar av eygleiðingum er sera avgerðandi um eygleiðingin skal kunna brúkast.

Hvussu vit eftirmeta og handla út frá eygleiðingum eigur at koma í fastar skrivaðar rammur. Fastar mannagongdir eru neyðugar.

## 8.0 Førleikamenning

Í sambandi við førleikamenning metir bólkurin, at øll eiga at verða førleikament undir somu treytum tá talan er um "normal" økið – her verður serliga hugsað um skeið, sum eru viðkomandi fyri øll starvsfólk.

Toymisarbeiðið leggur upp til, at vit skipa fyri felags fundum, skeiðum o.ø. Er talan um starvsfólk við servitan innan ávís øki, er møguleiki fyri at viðkomandi persónur kann vegleiða og ráðgeva øðrum starvsfólkum í Eysturkommunu, um tørvur er á tí.

Harafturat kann ein ætlan verða gjørd fyri førleikamenningina hjá hvørjum starvsfólki. Leiðarin eigur at gera hesa ætlan, møguliga í sambandi við starvsfólkasamrøður, um hann hevur tað. Hugsast má um, at starvsfólkini sleppa á skeið, sum hava týdning fyri menningina av teirra fakliga førleika. Her verður eisini hugsað um felagsskeið, sum kunnu menna fakliga førleikan hjá starvsfólkunum, og verða við til at menna felagskensluna hjá starvsfólkunum. Felags kensla er við til at menna samstarvið í einum stovni og millum stovnar, t.d. at vit arbeiða øll við at menna børn og ung í Eystukommunu.

## 9.0 Kunning

Tað er av stórum týdningi at kunning um úrslitið hjá arbeiðsbólkinum verður kunnað á so skynsaman hátt sum til ber, soleiðis at øll kunnu kenna seg trygg.

- tilmælið eigur at verða lagt á heimasíðuna hjá kommununi
- tilmælið eigur at verða góðkent av Eysturkommunu, áðrenn tað verður lagt út á heimasíðuna

Kunning fyri foreldur og starvsfólk eigur av verða fyriskipað aftaná, at tilmælið er góðkent av Eysturkommunu.

# Tíma- og lærarabýti
# í
# Eysturkommunu

April 2010

**Innihald**

Samandráttur ... 66

1.0 Grundarlag ... 68

1.1 Býráðssamtykt ... 68

1.2 Verkætlanarfyriskipan ... 68

1.3 Endamál og arbeiðssetningur ... 69

2.0 Byrjan ... 70

2.1 Verkætlanarbyrjan og væntanir ... 70

2.2 Teambuilding ... 70

3.0 Verandi støða og møguleikar ... 71

3.1 SWOT-greining ... 71

4.2 Visión í mun til arbeiðssetning ... 72

5.0 Tíma- og lærarabýti ... 72

6.0 Tilmæli ... 74

**Samandráttur**

Í Eysturkommunu eru tveir skúlar, Gøtu skúli og Leirvíkar skúli.
Leirvíkar skúli fer komandi skúlaár at hýsa grundstigi, t.e. 0.-3. flokk, har koma at vera 102 næmingar.
Gøtu skúli fer at hýsa miðstigi, t.e. 4.-7. flokk, har koma at vera 135 næmingar.

Arbeiðsbólkur fyri tíma- og lærarabýti

Kommunuskrivstovan í Eysturkommunu, tann 29. apríl 2010

| | |
|---|---|
| Fríðfinnur Johnsson | Karl Thomsen |
| Annika K. Joensen | Rúni Gaardbo |

## 5.0 Grundarlag

Býráðið í Eysturkommunu samtykti tann 22. apríl 2009 at gera bygnaðarbroytingar á skúlaøkinum í kommununi, sum skulu fremjast í verki í skúlaárinum 2010/2011.

### *1.1 Býráðssamtykt*

Býráðssamtyktin er soljóðandi:
Skúlabygnaðurin í Eysturkommunu verður skipaður av nýggjum, við at innskúling, t.e. forskúli og ella 1. til 3. flokkur verður í Leirvíkar skúla, og miðdeild, t.e. 4. til 7. flokkur, verður í Gøtu skúla. Framhaldsdeildin heldur fram inni í Fuglafirði. Hendan broytingin verður framd í verki, skúlaárið 2010/2011, og farið verður undir at tillaga bygningarnar við tað sama.

### *1.2 Verkætlanarfyriskipan*

Fyri at skapa bestu fortreytir fyri hesi broyting er settur ein arbeiðsbólkur, ið skal koma við uppskoti til tíma- og lærarabýti í skúlunum.

Í arbeiðsbólkinum eru vald fólk við førleika og áhuga á økinum. Limirnir í arbeiðsbólkinum eru: Fríðfinnur Johnsson, fyrstilærari við Leirvíkar skúla, Karl Thomsen, fyrstilærari við Gøtu skúla, Annika Joensen, lærari við Leirvíkar skúla og Rúni Gaardbo, formaður í bólkinum, lærari við Gøtu skúla og limur í verkætlanarbólkinum.

### *1.3 Endamál og arbeiðssetningur*

**Endamál**

Endamálið er at samskipa tíma og lærarabýti á báðum skúlunum, sum um talan er um ein skúla, soleiðis at næmingurin fær bestu fortreytir fyri læring og lærarin fær bestu karmar at virka undir.

**Arbeiðssetningur**

Hvussu skal tíma og lærarabýti í Eysturkommunu skipast fyri at røkka endamálinum og í størst møguligan mun ganga ynskjunum frá lærararunum á møti.

Undirpunkt:
Hvussu kann tíma og lærarabýti skipast við felagsumsiting?
Hvussu samstarva vit um lærugreinar og tímatalvu?
Hvussu kann liðileikin (fleksibiliteturin) í virksemisætlanunum gangnýtast á fullgóðan hátt?
Hvussu fáa vit sum mest burturúr námsfrøðiliga og fakliga?
Hvussu kann sami lærari hava ein flokk øll sjey árini?
Hvussu kunnu vit skipa fyri spennandi felagstiltøkum?

**Arbeiðs- og tíðarætlan**

Februar til apríl 2010 (sí hjálagda skjal – arbeiðs- og tíðarætlan)

## 6.0 Byrjan

### *2.1 Verkætlanarbyrjan og væntanir*

Fyrsti fundurin var 8. mars 2010. Á hesum fundi varð grundarlagið fyri arbeiðinum gjøgnumgingið og viðgjørt.

### *2.2 Teambuilding*

8. apríl varð arbeitt við teambuilding fyri at samansjóða bólkin og fyri at fáa íblástur til arbeiðið. Her vóru eisini spælireglur gjørdar og vóru tær:

- ✓ Vit vita hvat vit møta til, og skráin fyri fundirnar kemur í góðari tíð
- ✓ Um okkurt óvæntað er, verða boð givin beinanveg
- ✓ Vit eru opin og erlig
- ✓ Vit eru tilstaðar
- ✓ Vit eru samstarvssinnað
- ✓ Vit góðtaka tey úrslit, sum vit koma til
- ✓ Vit halda fokus
- ✓ Vit halda avtalur
- ✓ Vit vísa virðing fyri hvørjum øðrum
- ✓ Vit møta og enda til tíðina

## 7.0 Verandi støða og møguleikar

### *3.1 SWOT-greining*

Fyri at skapa bestu fortreytir at arbeiða út frá, hevur verkætlanarbólkurin gjørt eina SWOT-greining í mun til skúlabygnaðin. SWOT-greiningin lýsir hvørjar styrkir, veikleikar, møguleikar og hóttanir eru í skúlabygnaðinum.

## SWOT-greining fyri toymi

**Strength (Styrkir)**

- Vitan um evnið
- Ymiskir førleikar
- Ynskja øllum tað besta
- Førleikar
- Ymsar bakgrundir/víðskygni
- Ymsir aldrar og kyn

**Weakness (Veikleikar)**

- Manglandi tíð – nógv um oyruni
- Hála hvør sín veg
- Væntandi vitan um ymisk viðurskifti, tímar o.a.
- Fysiskt atskild (geografiskt)
- Líkjast ov nógv (somu útb. av sama seminarium)
- Málið er ógreitt – um vit ikki finna eitt mál
- Um vit ikki finna ella nýta spælireglurnar

**Opportunities (Møguleikar)**

- At skapa góðar loysnir
- Raðfesta uppgávuna
- Fáa til vega neyðuga vitan og seta felags mál og
- Finna nýggjar samskiftishættir
- Vit fáa eina góða blanding av, at vit hava ymskar bakgrundir + aldur + líkheit kann skapa ein møgleika
- Møguleiki at fina eitt mál

**Threat (Hóttanir)**

- Myndugleikar
- Ótryggleiki hjá starvsfólkunum
- Um neyðugt tilfar ikki kemur fram

## SWOT-greining fyri tíma og lærarabýti

**Strength (Styrkir)**

- L.S. – lætt at dekka lærugreinir
- Báðir skúli: Lærarir specialisera seg
- L.S. – Eingi serhøli – Høli frígivin
- Lærarir specialisera seg
- Fleiri samstarvsfelagar á sama aldursstigi
- Meir tilfar til ávísan aldursbólk

**Weakness (Veikleikar)**

- G.S. – Torført at dekka allar faklærugreinar við fáum lærarum.
- Sera torført at gagnnýta lærarastabin í tveimum skúlum.
- Færri tímar tillutaðir – hægri klassakvotient
- Trýsti á fakhølini verður ov størst/mangladi fakhøli
- Fyri fakliga orientaraðar lærarar/tveir skúlar
- Tveir skúlar
- Yngri og eldri aldursbólkar eru atskildir.

**Opportunities (Møguleikar)**

- Betri lærarasamstarv um lærugreinar/ dupultur árgangur
- Samstarva um lærarar
- Útbyggja skúlan til ávísan aldursbólk
- Fjølbroytni at skipa dagin ørðvísi

**Threat (Hóttanir)**

- G.S.- Umstøður gera at lærarar møguliga flyta.
- Tveir skúlar / tveir leiðarar / tvær tímartalvur
- Lærarakreftir fara til spillis innan fakligheit
- At lærarar ynskja at arbeiða á hinum skúlanum og fáa tað noktað.

### *4.2 Visión í mun til arbeiðssetning*

Arbeiðsbólkurin hevur sett upp eina visión. Visiónin lýsir ynskiliga úrslitið í mun til arbeiðssetningin.

**Visión:**
**Ein skúli**
**Skúlarnir mugu skjótast gjørligt leggjast saman í ein skúla, t.v.s. eina leiðslu!**

### 5.0 Tíma- og lærarabýti

Niðanfyri eru fakta um skúlarnar, sum nú er:

**Fakta nú:**

- Tað eru tveir skúlar við hvør sínari leiðslu.
- Tímar eru játtaðir til hvør sín skúla av MMR.
- Lærararnir eru settir við hvør sín skúla
- Lærararnir eru settir eftir tí tørvi, sum skúlarnir hava havt.
- Fyri at einstakur lærari skal kunna arbeiða á báðum skúlunum, má viðkomandi lærari góðkenna tað og báðar leiðslurnar mugu góðkenna hetta og síggja fyrimunir við hesum.
- Umstøðurnar hóska ikki nóg væl til serlærugreinarnar í Gøtu.

**Hvat kann gerast:**

Um lærarar koma at arbeiða á báðum skúlum, so mugu fríkorterini vera tey somu á báðum støðum. Hesin spurningur verður viðgjørdur og lýstur í NR-ráðini. Sum nú er, eru fríkorterini ikki eins.

Um so er, at lærari kemur at arbeiða á báðum skúlunum og ikki hevur møguleika fyri flutningi sjálvur, má kommunan skipa fyri flutningi ímillum skúlarnar.

Fyri at gera yvirgongdina til nýggja strukturin lættari í byrjanini, eiga skúlarnir í størsta mun at arbeiða við tí starvsfólki, sum er sett við skúlan, har lærararnir eru settir.

Um lærugreinatørvurin skal verða dekkaður við fakfólki í øllum lærugreinunum, má lærarahópurin økjast, hetta er serliga galdandi fyri Gøtu skúla.

Møguliga kann tíð til menningararbeiði, í virksemisætlanini, brúkast til at løna starvsfólki, ið arbeiða á tveimum skúlum, men hetta má kannast nærri.

Í Leirvíkar skúla eru tríggjar høvuðslærugreinar, sum eisini eru í Gøtu skúla. Lærugreinarnar eru føroyskt, støddfrøði og danskt.

Skúlarnir fara í mestan mun at brúka somu bókarøðir í lærugreinunum.

Leiðararnir á báðum skúlunum møtast, saman við umsitingarleiðaranum hjá Eysturkommunu, at samskipa lærutilfar, ið skúlarnir báðir kunna lata hvør øðrum.

Tá flokslærari er settur á 4. flokk í Gøtu, kemur 3. flokkur at vitja skúlan og kunna seg um umstøðurnar.

Tá tiltøk/vitjanir eru á skúlunum, ella aðrastaðni, er tað gott at samskipa hesi, ella at bjóða hvørjum øðrum við. Hetta kann eisini vera, tá flokkar skipa fyri tiltøkum ella framførðslum.

## 6.0 Tilmæli

Skúlarnir mugu skjótast gjørligt leggjast saman í ein skúla, t.v.s. eina leiðslu!

Verður hetta gjørt, verða omanfyri nevndu punkt óviðkomandi, tí ein felags leiðsla verður, ið tekur avgerðir fyri skúlarnar báðar. Á henda hátt fær skúlaleiðarin ein breiðari hóp av lærarum at arbeiða við til fyrimun fyri skúlarnar báðar. Um ein lærari kemur at arbeiða á báðum støðum, er umráðandi, at hetta verður gjørt í samráð við læraran.